# GERÐABÓK

**Dato:** 28. april 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 79/22 – 101/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Ruth Vang
Rói Bjarnason Poulsen
Helena Dam á Neystabø
Jan Kartin Christiansen

**LUTTÓKU EISINI:**
Bogi Jacobsen
Eyðna Justinussen
Eyðfríð Jacobsen
Jóan Petur Hentze

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 366<br>Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 79/22 | 22/01372-1 | Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 28. apríl 2022 | 368 |
| 80/22 | 22/01943-1 | Súna Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 28. apríl 2022 | 369 |
| 81/22 | 22/01962-1 | Annika Olsen berst frá at møta á býráðsfundi 28. apríl 2022 | 370 |
| 82/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 371 |
| 83/22 | 14/03352-63 | Viðvíkjandi byggifreist og afturtøka av matr. nr. 21f, Kirkjubøur | 373 |
| 84/22 | 20/00868-1 | Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr) | 375 |
| 85/22 | 16/01316-10 | Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali | 386 |
| 86/22 | 22/00816-2 | Kvøldskúlin : Upptøkutreytir og málbólkur til føroyskt sum annaðmál (FSA1-3) | 395 |
| 87/22 | 20/01962-1 | Verkløg við Hoyvíksvøll | 398 |
| 88/22 | 21/01777-1 | Útstykking oman fyri Argjahamar | 406 |
| 89/22 | 18/03468-1 | Skipan av Stórutjørn | 411 |
| 90/22 | 21/04706-2 | Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matriklar 1300a, 1300b og 1301a, Hoyvíksvegur 45, 47 og 49, Tórshavn | 422 |
| 91/22 | 22/00644-2 | Nýggj serstøk byggisamtykt við Miðhorn | 425 |
| 92/22 | 22/01036-1 | Menning av Vágsbotni – Ætlan fyri Summarið 2022 | 427 |
| 93/22 | 22/00878-1 | Strikan av servitutti á matr.nr. 1401a, Tórshavn | 431 |
| 94/22 | 21/05182-2 | Umsókn um yvirtøku av vegi | 433 |
| 95/22 | 22/00309-7 | Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1097o, Lambagerði, Tórshavn | 435 |
| 96/22 | 20/04029-1 | Ferðslutrygd við Eysturskúlan | 437 |
| 97/22 | 22/01377-1 | Vinnuútstykking á Ovara Hjalla | 439 |
| 98/22 | 22/01384-1 | Keyp av mannskapskúrum til bygningsrakstur | 442 |
| 99/22 | 21/02196-2 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK | 444 |
| 100/22 | 22/01410-1 | Bráðfeingis ábøtur á vegakervið 2022 | 449 |
| 101/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 451 |

**Til viðgerðar**

## 79/22 Birgir Nielsen berst frá at møta á býráðsfundi 28. apríl 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 79/22 | 22/01372-1 |

**Málslýsing**
Birgir Nielsen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Rói B. Poulsen, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 80/22 Súna Mørk berst frá at møta á býráðsfundi 28. apríl 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 80/22 | 22/01943-1 |

**Málslýsing**
Súna Mørk hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Helena Dam á Neystabø, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 81/22 Annika Olsen berst frá at møta á býráðsfundi 28. apríl 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 81/22 | 22/01962-1 |

**Málslýsing**
Annika Olsen hevur boðað frá, at henni berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jan Christiansen, eru loknar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 82/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 55/22 | 22/00011-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 82/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið til eftirtektar.

| | Býráðsfundur<br>28. april 2022 | Blað nr.: 373<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 83/22 Viðvíkjandi byggifreist og afturtøka av matr. nr. 21f, Kirkjubøur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 111/22 | 14/03352-63 |
| 2 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 83/22 | 14/03352-63 |

**Upprunin til málið**
Kommunan hevur rykt eigara av matr.nr. 21f, Kirkjubøur, viðvíkjandi byggifreist.

**Lýsing av málinum**
Grundstykkið er til víddar 806m2.

Grundstykkið er planerað og gjørdur er ein stuðlamúrur á ognini móti grannanum.

Skeytið er tinglýst. 26.09.2002, keypspeningurin fyri grundstykkið var kr. 193.440,-

Viðkomandi afturskeytar grundøkið matr. nr. 21 f, Kirkjubøur-Argir, fyri sølukostnaðin íroknað útreiðslur til byggibúning, ið er gjørt á stykkinum íalt kr. 320.000,00 –

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kommunustýrislógin. Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari ogn. Tinglýstir servituttir. Reglur fyri viðgerð av umsókn um útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað.

Á ognini er sambært skeyti millum viðkomandi og kommununa, tinglýst byrða, hareftir seljarin kann krevja ognina aftur, um sethús ikki verða bygd á ognini innan 2 ár, frá tí at skeytið er tinglýst

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tórshavnar kommuna rindar útreiðslur til tinglýsing.
Tá ið kommunan er tinglýstur eigari av grundstykkinum, verður grundstykkið í fyrsta lagi bjóðað møguligum umsøkjara við bráfeingis tørvi, og í øðrum lagi lýst til sølu hjá ognarmeklara

**Onnur**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| | Blað nr.: 374 |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at keypa grundstykkið
aftur frá eigara, og at afturrinda eigara uppruna keypsprísin kr. 193.440,-umframt útreiðslur fyri byggibúning kr. 126.560,-, tilsamans kr. 320.000.

Vìsandi til, at talan er um grundøki í eldri útstykking verður mælt til at selja grundøkið aftur hjá meklara í fríari sølu.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

# 84/22 Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 63/20 | 20/00868-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 315/20 | 20/00868-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 329/20 | 20/00868-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 298/20 | 20/00868-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 11/21 | 20/00868-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 19/21 | 20/00868-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 70/21 | 20/00868-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 153/21 | 20/00868-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 147/21 | 20/00868-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 171/21 | 20/00868-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 15.11.2021 | 277/21 | 20/00868-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 308/21 | 20/00868-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 280/21 | 20/00868-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 321/21 | 20/00868-1 |
| 15 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 313/21 | 20/00868-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 25/22 | 20/00868-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 33/22 | 20/00868-1 |
| 18 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 27/22 | 20/00868-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 95/22 | 20/00868-1 |
| 20 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 94/22 | 20/00868-1 |
| 21 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 84/22 | 20/00868-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt hin 30. oktober 2019 í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar um at Realskúlin, Skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Gjørt er uppskot til skipan av stovninum, harundir viðvíkjandi plásskapasiteti. Gjørt er eisini uppskot til tillaging av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi og kostnaðarmeting tí viðvíkjandi.

Skotið verður upp, at stovnsheitið verður Miðstovnurin, sum longu verður brúkt á staðnum.

Í viðgerðina er eisini tikin við vøggustovuvirksemið, sum Miðstovnurin hevur í Hornabø. Harumframt hevur eisini verið viðgjørt hølistørvur til børn við serligum tørvi, sum í dag heldur til í leigumáli á Frælsinum.

Hølisstøðan hjá Stella Maris Vøggustovu hevur eisini verið viðgjørd sum partur áv hesum máli, sí tilmæli í máli 19/01795.

Høvuðsbygningarnir eru Realskúlin og Kongagøta við hvør sínum fimm stovum. Til ber at skipa virksemið alt eftir tørvi (hóskandi *flowi*). Samlaði plásskapasiteturin í báðum bygningunum verður uml. 50-53 vøggustovubørn og 100-110 barnagarðsstovubørn.

Húsini hjá Frk. Cohr gevur Miðstovninum umstøður til børn við serligum avbjóðingum, har møguleiki er at fara burtur frá eftir tørvi, umframt til annað atknýtt virksemi hjá stovninum. Garðsøkið verður skipað eftir aldri á børnunum.

Miðstovnurin hevur vøggustovu í Hornabø. Nú Miðstovnurin verður víðkaður, er fyri virksemið skilabest er at flyta alt virksemið á eitt stað.

Bygningurin í Hornabø verður hinvegin mettur væl egnaður at hýsa tilboðnum til børn við serligum tørvi, sum í dag eru á Frælsinum. Í hesum sambandi verður mælt til at siga upp leigusáttmála við UMMR og flyta tilboðið í Hornabøm, tá bygingurin verður tøkur.

Gjørt er uppskot til tillagingar av bygninginum í Kongagøtu, sí skjal. Gjørd er eisini kostnaðarmeting av hesum íroknað garðsøkið, sí skjal. Hesi verða løgd fram á fundinum.

Íløgujáttan er ikki tøk til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova
18/02825 Leigumál á Frælsinum

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|

| | **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 377<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Byggingin, tá allur bygningurin er tikin í nýtslu, er ætlað at økja plásskapasitetin, sum hevur við sær øktan rakstur samsvarandi barnatalinum. Væntað verður, at aftrat teimum 5 mió í íløgujáttan 2021 skulu aðrar umleið kr. 2 mió til at fáa allan bygningin kláran.

| | **Rakstrarjáttan** | **Løgujáttan** |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 5.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | **Á** | | | **Av** | | | **Lokað** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 3175 | Nýggj projektkonta | | 3175 | L00001 Løgukarmur | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarastjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið og fíggjartørvin.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til málslýsingina omanfyri og íløgujáttan í fíggjarætlanini 2021 kr. 5 mió á løgukontu 3175 Barnaansing til Miðstovnin.

Skúlavirksemið í skúlanum í Kongagøtu er flutt út á Fløtir, og alstórur tørvur er at fáa bygningin gjørdan kláran til dagsstovnavirksemið hjá Miðstovninum (fevnandi um Realskúlan, skúlan í Kongagøtu og Frk. Cohr-húsini), sum áður er samtykt.

Partur av hesum er at flyta dagstovnavirksemi úr øðrum hølum. Frítíðartilboðið á Frælsinum 30 til børn við serligum avbjóðingum skal flyta til Hornabø í seinasta lagi um ársskiftið, tá leigumálið við UMMR gongur út. UMMR hevur gjørt nýggja leiguavtalu við ÍSF um hølini. Vøggustovuvirksemið, sum er í Hornabø í dag, skal flyta í Miðstovnin.

Í løtuni eru frammanundan ov nógv børn í Realskúlanum, tí ætlanin at gera skúlan í Kongagøtu um til dagstovnavirksemið hevur drigið út. Neyðugt er at gera bráðfeingis tillagingar í Frk. Cohr-húsinum (smáar tillagingar) og í skúlanum í Kongagøtu (meira umfevnandi).

Aftrat hesum er alneyðugt at lata upp fleiri vøggustovupláss í BARN skipanini. Framrokning av plásstørvi vísir, at í januar 2021 og frameftir vanta í minsta lagi 47 vøggustovupláss. Verða ikki fleiri vøggustovupláss útvegað, verður bíðitíðin hjá foreldrum at fáa pláss til børnini enn drúgvari. Harumframt tekur Stella Maris Vøggustova ikki fleiri børn inn.

Játtanin er tí eisini ætlað til at lata tvær vøggustovur (uml. 18-20 pláss tilsamans) upp aftrat í Miðstovninum sum skjótast tíðarætlan fyri tillagingarnar er greið.

Hesar kr. 5 mió røkka til ein part av ætlaðu bygningstillagingunum, men nóg mikið til at fáa virksemið í parti av bygninginum í gongd og góðkent. Umframt okkurt smávegis arbeiði í Frk. Cohr-húsinum er tað serliga ovara hæddin í Kongagøtu, har innrættast skal nýggj vøggustova við skiftiumstøðum, verjur móti trappum, nýggjan felags køk, vesini tillagast til vøggustovur við skifti møguleikum og smáum kummum, garderobur o.a. skal setast upp, og málaraarbeiði skal gerast.

Neyðugt er at fáa arbeiðið í gongd beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at heimila umsitingini at fyrireika og gera avtalur um ymsu arbeiðini á Miðstovninum, og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió á kontu 3175 Barnaansing til løgukontu við heitinum Miðstovnurin.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum við tí ískoyti, at arbeiðið skal bjóðast út og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, mæla til at bjóða arbeiðið út og leggja málið fyri aftur til støðutakan tá tilboð eru innkomin.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøður ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrisitingin boðaði nevndini í tposti 25. januar 2021 frá bráðfeingis hølistørvi til dagstovnin Miðstovnin, sum loystur verður við at stutttíðarleiga høli frá Bústøðum í Finsen, og sum nú verður formliga lagt fyri nevndina, sí avtaluuppskot.

Talan er um loysn í uml. 6 mánaðir, ið kostar kr. 20.000 mánaðarliga umframt el/hita, sí sáttmála, har til ber at leingja leigumáli stutt tíðarskeið eftir tørvi.

Arbeiðið at gera skúlan í Kongagøtu til dagstovnavirksemi verður í fyrsta lagi liðugt í summar, møguliga nakað út á heystið. Í løtuni verður útboð fyrireikað. Tá tíðarætlanin er greið ber til at bjóða nýggj pláss í BARN.

Støðan hevur avleiðingar bæði fyri Miðstovnin og serfrítíðarskúlan á Frælsinum, hvørs leigumál á Frælsinum gekk út á nýggjárinum, og har ÍSF sum nýggjur leiðari ikki er sloppin inn vegna virksemið hjá kommununi í bygninginum.

Beint nú eru 32 vøggustovubørn og 43 barnagarðsbørn í realskúlanum. Hetta er alt ov nógv í mun til støddina á bygninginum. Ætlanin var, at barnagarðsbørnini longu vóru flutt í Kongagøtu, og við hølunum í Finsen ber til at flyta flestu barnagarðsbørnini úr realskúlanum, sum sostatt gevur ta luft, ið skal til fyri at realskúlin kann hava eitt vanligt barnatal.

Hølini krevja ávís arbeiði at gera klár til dagstovnavirksemi m.a. garderobur, vask, ljóðplátur og hegn millum bygningarnar. Arbeiðið er sett í gongd. Ætlanin er at fíggja hesar tillagingar og rakstur av hølunum við verandi játtanum konta 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur.

Útbjóðing av arbeiðinum í Gula skúla er undir fyrireiking og ætlast lagt fyri nevndina á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla til at samtykkja leiguavtaluna við Bústaðir fíggjað av kontu 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtykt 17. desember 2020, har umsitingini er heimilað at bjóða út arbeiðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn og gera avtalur um ymsu arbeiðini.

Síðan tá er leigumál gjørt viðvíkjandi hølum í Finsen sum bráðfeingis loysn viðvíkjandi plássum. Eisini er verkætlanin nágreinað og kostnaðarmett, sí hjálagdu tekningar og kostnaðarmeting.

Heimildin at gera avtalur fevnir um tøku játtanina kr. 5 mió. Sbrt. kostnaðarmetingini verður hetta tepurt. Tá tilboðini koma inn, má metast um møguliga meirfígging ella tillaging av verkætlanini.

Kostnaðarmetingin fevnir eisini um útiøkið og spælipláss, sum í ávísan mun eisini hevur samband við Grasagarð, Frk. Cohr garðin og Finsen. Við atliti at tøku játtanini verður tó mett neyðugt at raðfesta arbeiðið við bygninginum fyrst, men soleiðis, at girðingar og trygd kring økið verður gjørd til tess at dagstovnaplássini kunnu fáast í brúk skjótast.

Harumframt skal upplýsast, at sjálv Kongagøtan í næstum verður grivin upp í sambandi við fjarhitaleiðing, og at tað í mun til útiøkið og spælipláss til Miðstovnin er skilabest at bíða eftir, at tað arbeiðið er liðugt. Tíðarætlan í hesum sambandi er ógreið í løtuni. Aftrat skulu skúrarnir í Frk. Cohr-garðinum av økinum fyri at geva pláss til spælipláss og útileikur. Arbeiðið við útiøkinum verður tí at taka upp seinni og játtan útvegast til tað.

Arbeiðið verður boðið út til tveir arbeiðstakarar sum undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Lisitatión var 7. mai 2021. Úrslitið varð hetta:

- Búsetur kr. 6.805.598
- North kr. 8.365.894

Eingin teirra hevur fyrivarni.

Samlaða kostnaðarmetingin, sí hjálagt, við innbúgvi, ráðgeving, spælipláss/spæliútgerð, mvg, óvæntað v.m. er kr. 11.482.137,45 – tá er roknað við kr. 2 mió til spæliplássið/spæliútgerð, sum mett verður er alneyðugt at hava við, so at námsfrøðiliga virksemið inni og úti kann virka nøktandi.

Byggiarbeiðið verður sambært ætlanini liðugt miðjan mars 2022. Leigumálið um fyribilshøli til stovnin í Finsen má leingjast samsvarandi byggitíðini, tvs. til og við mars 2022. Útreiðslan er tikin við í kostnaðarmetingina omanfyri.

Tøk løgufígging til hesa verkætlanina L31012 Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin) er kr. 5 mió, fíggjartørvur er sostatt kr. 6,5 mió.

Á grein 3 í fíggjarætlanini eru tvær aðrar íløgujáttanir til ávikavist Dagstovnin á Argjum kr. 1 mió og Frítíðarskúlan í Kollafirði kr. 2 mió. Báðar verkætlanir eru í fyrireiking.

Skotið verður tí upp, at restfíggingin til umbyggingina av Miðstovninum við spæliplássi kr. 6,5 mió verður játtað til endamálið í íløguætlanini fyri 2022.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til:

- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur,
- at restfígging kr, 6,5 mió verður játtað til endamálið av íløguætlanini 2022,
- at leingja leiguavtalu við Bústaðir um høli í Finsen til og við mars 2022, og

at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setir málið á skrá við uppskoti um at annulera útboðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn, og í staðin at útvega nýggj pláss í Lonunum í Hoydølum og í Stella Maris Vøggustovu. Víst verður í hesum sambandi til mál 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu, sum er til viðgerðar í trivnaðarnevndini, og har ætlanin er at brúka bygningin í Kongagøtu til skúla. Víst verður eisini til mál 19/01963 Tøkir skúlabygningar og 19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
**Miðstovnurin:**
Samráðingar hava verið við Búsetur um arbeiðstøkusáttmála. Samráðingarnar eru steðgaðar vegna omanfyri nevnda. Tað er í skrivandi løtu ógreitt, um Búsetur leggur fíggjarligt krav móti kommununi.

Uppskotið hevur við sær, at bygningurin í Kongagøtu ikki verður partur av Miðstovninum sum samanhangandi dagstovnur við realskúlan og Frk. Cohr-húsið.

Hetta broytir ætlanina við Miðstovninum í miðbýnum grundleggjandi, serliga við atliti at plásskapasitetinum.

Arbeitt hevur verið fram í móti, at Miðstovnurin við Kongagøtu og Realskúlanum kundu hava 4 vøggustovur við tilsamans 51 plássum og 5 barnagarðsstovur við tilsamans 110 plássum. Um Miðstovnurin framyvir bert er realskúlin, er talan um 1 vøggustova við tilsamans 14 plássum og 3 barnagarðsstovur við 38 plássum í alt.

Samlað er talan um 37 færri vøggustovupláss og 72 færri barnagarðspláss á Miðstovninum enn roknað var við.

Miðstovnurin hevur í dag stutttíðar leigumál í Finsen, tí hesi børn skuldu ætlandi í Kongagøtu næsta summar. Nakrar smáar tillagingar vórðu gjørdar í hølunum í hesum sambandi. Finsen verður mett ikki at vera nøkur varandi loysn til dagstovnavirksemi, men í eini tillagingargongd, har Miðstovnurin í realskúlanum fær skipað seg, verður neyðugt at halda fram við leigumálinum eini tvey-trý ár aftrat.

Um stovnurin skal halda fram har, so skulu størri tillagingar gerast, eitt nú eru tað betong gólv og ógvuliga hart hjá starvsfólkum at ganga á og hjá børum at spæla á. Umframt annað gólv, mugu eisini vesi viðurskiftini gerast betri.

Í hesi tillagingargongd verður ikki latið upp fyri fleiri plássum í Miðstovnunum, tí talið av børnum er alt ov høgt í mun til, hvat realskúlin rúmar. Nýggj pláss til vøggustovu og barnagarðsstovu verða ikki at fáa aftur fyrr enn 1. august 2024. Tá svarar barnatalið til tað, sum realskúlin rúmar.

Støða skal eisini takast til, hvussu realskúlin skal skipast bæði í mun til tal av plássum og samanseting av vøggustovu og barnagarðsstovu. Bygningurin hevur tørv á umvælingum og dagføringum, skal allur bygningurin, m.a. eisini loftið, kunna nýtast til dagstovnavirksemi. Eisini manglar stovnurin spælipláss, goymslupláss til leikur, og pláss at stilla barnavognar, tá vøggustovubørnini sova.

Væntað hevur verið, at Miðstovnurin tók nýggj børn inn í bygningin í Kongagøtu frá summarinum 2022. Foreldur hava samsvarandi havt møguleika at bóka pláss á Miðstovninum. Broytingin hevur við sær, at 10 foreldur skulu hava boð um at bóka annað pláss á øðrum stovni ella fáa í boði fyribilspláss í Lonunum í Hoydølum.

Steðgað verður samstundis fyri nýggjum upptøkum í Miðstovninum fram til januar 2024, tí stovnurin, nú Kongagøta ikki er í myndini, hevur ov nógv børn inn alt hetta tíðarskeiðið (upp til 14 børn ov nógv í barnagarðinum og 17 í vøggustovuni).

**Annar plásskapasitetur:**
Við ætlanini at lata Stella Maris Vøggustovu at halda fram eru 35 vøggustovupláss tøk, tá stovnurin er fullur. Stovnurin hevur havt hægri barnatal, men tað hevur verið hægri enn fermetratalið pr. barn loyvir. Bygningurin skal umvælast, endalig tíðarætlan og kostnaðarmeting er ikki tøk, heldur ikki, um neyðugt er at steingja stovnin í byggitíðini.

Sankta Jósefs Barnagarður fer at hava 2 vøggustovur og 2 barnagarðsstovur, áður vóru 4 barnagarðsstovur við tilsamans 85 plássum. Hetta hevur við sær, at talið av barnagarðsplássum lækkar við tilsamans 34 plássum yvir tvey ár. Hinvegin koma koma tilsamans 20 nýggj vøggustovupláss yvir 2 ár.

Lonirnar í Hoydølum eru í verandi støðu bert ein fyribilsloysn til ársenda 2023 samsvarandi loyvinum frá friðingarmyndugleikunum, sí skjøl 14 og 1). Ætlan um at endurútvega hesi pláss eigur at fara í gongd skjótast. Í løtuni hava upp til 27 børn fyribilspláss í Lonunum. Skal stórt tal av fyribilsplássum stovnast í Lonunum aftrat, er neyðugt at gera ávísar umstøður betri, eitt nú vesir og útiøki, og sum fígging má útvegast til.

Tá serskúlatilboðið í Lonunum er flutt í Eysturskúlan um nýggjársleitið, kann dagstovnavirksemið í Lonunum í Hoydølum víðkast til at fevna um 3 barnagarðsstovur (60 børn) og 4 vøggustovur (48 børn). Talan er tó um fyribilspláss, ikki um varandi pláss. Verða børnini tikin inn uppá fyribilspláss, má kommunan samstundis tryggja, at onnur varandi pláss eru tøk til at taka ímóti børnunum í seinasta lagi við ársenda 2023, t.e. um tvey ár, tá loyvið í Hoydølum gongur út.

**Plásstørvur:**
Í løtuni kann kommunan ikki vísa á onnur varandi pláss enn tey, sum eru í skipanini í dag, tí eingin útbyggingarætlan er í gongd. Samráðingar eru við Búsetur um útbygging av Dagstovninum á Hamrinum við fimm stovum, men hesi pláss verða ikki fyrr enn um 15-18 mánaðirnar í fyrsta lagi, um byggiarbeiðið byrjar nú. Støðan viðvíkjandi høvuðsumvæling ella nýbygging av Dagstovninum á Argjum er tá ikki tikin við.

Í juni 2021 varð átrokandi plásstørvurin mettur til at vera upp móti 90 børnum. Talan er her um børn, ið eru eldri enn 1 ár, og enn ikki vóru sloppin inn á stovn. Í løtuni er støðan við plásstørvi á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu tann, at tað støðugt eru fleiri børn á hvørjum stovni, enn tað í roynd og veru eru pláss til sambært reglunum. Samstundis hevur eitt vaksandi barnatal við fleiri stórum fylgjandi árgangum frá 2018 og fram til nú umframt tilflyting við sær, at tørvurin økist nakað afturat komandi árini.

Metti tørvurin á nýggjum føstum dagstovnaplássum er sostatt umleið 130 vøggustovupláss og 95 barnagarðspláss. Hesi pláss nøkta átrokandi tørvin, har hædd eisini er tikin fyri einum nakað vaksandi barnatali, samstundis sum at talið av børnum á verandi dagstovnunum ikki skal vera hægri, enn stovnarnir eru roknaðir til.

**Fíggjarviðurskifti dagstovnaøkið:**
Tey yvir 100 plássini í Kongagøtu var sera bílig loysn hjá kommununi at nøkta ein stóran part av plásstørvinum á dagstovnaøkinum. Í fíggjarætlanini 2021 eru kr. 5 mió settar av til endamálið og í fíggjarætlanaruppskotinum 2022 aðrar kr. 4 mió.

Skal realskúlin vera verandi dagstovnur, verður sum omanfyri nevnt neyðugt at gera hølisumstøðurnar betri umframt at etablera spælipláss. Eingin kostnaðarmeting fyriliggur. Harumframt kemur kostnaður at leingja leigumál í Finsen uml. kr. 250.000 um árið. Eingin kostnaðarmeting fyriliggur um aðrar tørvandi tillagingar í Finsen, sí eisini omanfyri.

At gera Stella Maris Vøggustova í nøktandi stand er mett til kr. 6-7 mió.

At gera neyðugar hølistillagingar í Lonunum í Hoydølum mugu síggjast saman við, at bygningurin, so sum loyvini nú eru, bert skal virka tvey ár aftrat, í øllum førum á hesum stað. Neyðugt er at fáa fleiri vesi gjørd. Eisini skal eitt hóskandi spælipláss gerast. Harumframt er kostnaður til at etablera fleiri stovur. Neyv kostnaðarmeting fyriliggur ikki. Leigukostnaður árliga er kr. 1,1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at taka støðu til at annulera útboðið viðvíkjandi arbeiðnum tillaga bygningin í Kongagøtu til dagstovnavirksemi.

**Mentamálanevndin 15. november 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at annulera útboðið viðvíkjandi tillagingum av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi. Harumframt samtykt, at játta kr. 800.000 av løgukontu 3175 Barnaansing av fíggjarætlanini 2022 til at betra hølisviðurskiftini í Finsen og útiøkið til Miðstovnin, og at játta kr. 800.000 av løgukontu 3175 Barnaansing av fíggjarætlanini 2022 til at gera umstøðurnar í Lonunum í Hoydølum klárar til størri barnatal, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, samtykti at halda fast í ætlanini at tillaga bygningin i Kongagøtu til dagstovnavirksemi.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at heimila umsitingini at gera sáttmála um arbeiðið at gera bygningin til dagstovnavirsekmið íroknað spælipláss innanfyri ein karm uppá kr. 3 mió at fíggja av løgukontu 3175 L31012 Miðstovnurin, og at leggja málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, mælir til at játta tær upprunaligu fimm milliónir krónurnar til arbeiðið at gera bygningin kláran til dagstovnavirksemi.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Gunvør Balle:

Mælt verður til:
- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur
- at restfígging kr. 6,5 mió. Kr. Verðu rjáttað til endamálið av íløguætlanini 2022
- at leingja leiguavtaluna við Bústaðirum høli í Finsen til og við mars 2022

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingar til upprunaligu verkætlanina, samtykt í býráðnum 17. desember 2020, hevur konta 6110 Umsiting og røkt av bygningum lagt út fyri ráðgevaraarbeiðið í tí sambandi.

Talan er um kr. 432.140 u/mvg fevnandi um arkitektaráðgeving kr. 132.090 u/mvg og ymsa verkfrøðingarráðgeving fyri kr. 300.050 u/mvg. Samlað við 25% mvg er upphæddin kr. 540.175.

Tá býráðið 16. desember 2021 játtaði kr. 3 mió sum karm uppá arbeiðið at gera bygningin í Kongagøtu kláran til dagstovnavirksemið av løgukontu 3175 L31012 Miðstovnurin, vóru omanfyri nevndu ráðgevaraútreiðslur ikki tiknar við.

Hesar útreiðslur tyngja raksturin á kontu 6110. Mett verður, at upprunaliga løgujáttanin til Miðstovnin eigur at fíggja hetta. Tann játtanin er nú at finna á LK31012 Miðstovnurin, har eru kr. 1.310.000 eftir. Skotið verður upp at játta kr. 540.175 v/mvg av løgujáttan 3175 Barnaansing LK31012 til L31012 Miðstovnurin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðari á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 540.175 v/mvg av løgujáttan 3175 Barnaansing LK31012 til L31012 Miðstovnurin til tess at fíggja nevndu ráðgevarakostnaðir, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Byggiarbeiðið at gera Miðstovnin í Kongagøtu kláran til dagstovnavirksemi er liðugt um stutta tíð, og ætlanin er at flyta inn við børnum uml. 1. mai 2022.

Hóast nakað av óvæntaðum útreiðslum, eru útlit fyri at verandi játtan á kr. 3. mió. til ábøtur á Miðstovnin fer at halda, men røkkur ikki til eisini at útvega innbúgv, køksbúna, leikur o.a.

Dagstovnurin verður fyribils avbyrgdur frá Kongagøtu við fyribilshegni. Hetta tí at fjarhitaarbeiði er í gerð, og eftirfylgjandi vegarbeiðið, sum er í Kongagøtu og Tórsgøtu,
kemur at halda fram til einaferð tíðliga í summar. Tá Kongagøta aftur verður tøk til Miðstovnin í summar, skulu spælihentleikar og spælipláss útvegast til Miðstovnin, men sum verandi játtan ikki kann bera.

Á løgukarminum, sum upprunaliga var ætlaður til Miðstovnin, eru kr. 770.000 eftir. Innbúgv v.m. er mett til uml. kr. 600.000. Skotið verður upp at játta tær kr. 770.000 til projektkontuna at fíggja innbúgv o.a.

Byggiarbeiðið at gera Miðstovnin í Kongagøtu kláran til dagstovnavirksemi er liðugt um stutta tíð, og ætlanin er at flyta inn uml. 1. mai 2022.

Á løgukarminum, sum upprunaliga var ætlaður til Miðstovnin, eru kr. 770.000 eftir. Innbúgv v.m. er mett til uml. 600.000. Skotið verður upp at játta tær kr. 770.000 til projektkontuna at fíggja innbúgv o.a.

Onnur játtan má fáast til vega viðvíkjandi spæliplássinum. Vent verður aftur til hetta, tá neyvari ætlan er gjørt og meting um kostnað er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 770.000 av løgukarmi 3175 Barnaansing LK31012 Miðstovnurin til løgukontu 3175 L31012 Miðstovnurin, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

## 85/22 Vegna nevndina í Bridgehúsinum Pól E. Egholm : Umbøn um fund viðvíkjandi Brigdehúsinum í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 17/18 | 16/01316-10 |
| 2 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 161/18 | 16/01316-10 |
| 3 Mentamálanevndin | 19.10.2020 | 268/20 | 16/01316-10 |
| 4 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 257/20 | 16/01316-10 |
| 5 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 107/21 | 16/01316-10 |
| 6 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 101/21 | 16/01316-10 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 117/21 | 16/01316-10 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2021 | 104/21 | 16/01316-10 |
| 9 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 158/21 | 16/01316-10 |
| 10 Mentamálanevndin | 22.06.2021 | 186/21 | 16/01316-10 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 173/21 | 16/01316-10 |
| 12 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 175/21 | 16/01316-10 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 219/21 | 16/01316-10 |
| 14 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 203/21 | 16/01316-10 |
| 15 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 216/21 | 16/01316-10 |
| 16 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 88/22 | 16/01316-10 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 71/22 | 16/01316-10 |
| 18 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 58/22 | 16/01316-10 |
| 19 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 85/22 | 16/01316-10 |

**Upprunin til málið:**
Brigdehúsið hevur vent sær til kommununa fyri at fáa avklára framtíðina hjá húsi felagsins, ið stendur á kommunalari grund.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í 2016 lat nevndin fyri Brigdehúsið skriv til kommununa viðv. verandi loysn fyri Brigdehúsinum í Gundadali. Húsið fevnir um virksemi hjá teimum 3 brigdefeløgunum í Havn. Sí hjálagt skriv.

Felagið hevur 3 uppskot til loysn:

1. At Tórshavnar kommuna veitir Brigdefeløgunum nýggj og egnaði høli. (sí hjálagt skriv við kravfesting).
2. At Tórshavnar kommuna yvirtekur Brigdehúsið í Gundadali nú og fremur tær neyðugu ábøturnar og

bridgefeløgini fáa framíhjárætt at nýta húsið.
3. At Tórshavnar kommuna leingir verandi leiguavtalu í minst 10 ár, og hjálpir bridgefeløgunum at fíggja neyðugar íløgur.

Síðani skrivið hevur umsitingin samskift við brigdehúsnevndina við atliti at pkt. 1 uttan at hetta hevur ført við sær nakað sum felagið tekur undir við.

Felagið keypti húsið í 1992 frá Havnar Bóltfelag (sí hjálagt skjal) og fekk leigusáttmála við kommununa sama ár (sí hjálagt skjal).  Í grein 2 er ásett at leigumálið ikki kann vera uppsagt fyrrenn til 1. Februar 2017, uttan so at leigarin í aðrar mátar ikki hevur hildið sáttmálan.

Á fundinum fer umsitingin at gjøgnumganga málið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið við atliti til at umsitingin vendur aftur til nevndina við ítøkiligum tilmæli til ein komandi fund.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt.
Marin Katrina Frýdal luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
17. Januar 2018 var ástaðarfundur millum umsitingina og nevndina í Brigdehúsinum og limafeløgunum. Myndir eru tiknar, ið eru tøkar í hjáløgdum skjali. Sí eisini avrit av virðismeting, ið Sp/f Protek gjørdi í 2011.

Eftir fundin fær kommunan skriv har feløgini siga:
*"At bridgefeløgini ikki hava nakað serstakt ynski um at eiga hølir ella hús til sítt virksemi. At tað snýr seg um at hava føst, góð og væl egnaði høli til virksemi, við so lítið stríð og so lítlan kostnað sum gjørligt – uppá langt sikt. At Tórshavnar kommuna (TK) kanska skal nýta øki har vit eru, og at TK ynskir at skapa góðar karmar fyri ítrótt og frítíðarvirksemi í kommununi, eigur tí at kunna loysast skjótt, trygt og gott. Hóast húsini treingja til ábøtur, so hava tey eitt virði á t.d. 2 - 3 mió kr, og tí ynskja bridgefeløgini, at ein avtala við TK avspeglar tann veruleikan, at TK við keyp og yvirtøku av húsinum fáa eitt stórt virði sum feløgini hava skapt.*

*Møguleiki 1 omanfyri kann bera til, og Frúutrøð bleiv nevnt. Ímóti talar, at TK ynskir at selja ognir ið "leypa av"og at bridgefeløgini trívast væl í Gundadali.*
*Møguleiki 3 omanfyri hevur ein avmarking í, at TK bert kann stuðla við 33%, og at bridgefeløgini ikki ynskja at verða byggiharri í slíkari verkætlan, og ei heldur at taka upp lán.*

*Við at tillaga møguleiki 2 ynskja vit tí fylgjandi:*
*At TK keypir bridgehúsið fyri kr 1,00, pluss møgulig skuld og aðrar skyldur. Afturfyri fáa feløgini ein 30 ára leiguavtala fyri kr 0,00 um árið, og soleiðis at bert rakstrarútreiðslurnar verða goldnar av feløgunum. (alternativt keypir TK nú, men yvirtaka dispositiónsrættin um 30 ár). (alternativt keypir TK fyri kr 3 mió, og feløgini leiga frá TK fyri 100.000 p.a. í 30 ár – men tað gevur tað sama). Langtíðar viðlíkahald og umvælingar verða framdar av TK eftir avtalu við feløgini. Innibera umvælingar av húsinum, at virksemi má flytast út úr húsinum, skal TK fáa til vega líknandi og hóskandi hølir í tíðarskeiðinum. TK kann siga upp leiguavtaluna, um so er, at TK skal nýta húsini til annað endamál ella at tey skulu takast niður. Hetta tó bert, um TK kann bjóða feløgini hóskandi og samsvarandi hølir aðrastaðni.*

*Feløgini eru sinnaði at samstarva um hóskandi loysnir, og eisini um talan skal verða um, at byggja út og deila hølini við t.d. talvfelagið."*

Økið húsini standa á, innganga í heildarætlanina fyri Tórsvøll/Gundadal. Tí er mest upplagt at húsini vera tikin burtur innan ávísa áramál. Eisini er upplagt at vita um felagið kann innganga í eina loysn saman við t.d. Telvingarfelagnum. Sí eisini mál 17/00846 Hølisviðurskifti o.a. – Havnar Telvingafelag.

**Tilmæli**
Trivnaðastjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at samráðast víðari við felagið um møguleikan at hýsa felagnum á øðrum stað og um møguligt saman við øðrum felag.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**:
Víst verður til viðgerð í máli 18/01969 Tøkir skúlabygningar, umframt til mál 16/01194 Herluf Jakobsen: Áheitan vegna Bragdið um útvegan av hølum til felagið.

Av tí at felagið rykkir eftir eini avkláring og av tí at tað ikki longur er serliga sannlíkt, at tað verður rúm í komandi tøku skúlabygningunum til virksemi hjá Brigdehúsfelagnum verður mett hóskandi at geva felagnum afturboðan um tað og at fara undir tilgongd viðv. yvirtøku av bygninginum og endurgjald fyri tí.

Byrjað verður við samráðingum og roynt at fáa eina semju. Um tað ikki ber á mál verður er skipan í galdandi leigusáttmála um at partarnir biðja tveir óheftar metingarmenn um at áseta eitt hóskandi endurgjald fyri ognina á leigaðum lendi.

Á fundinum greiðir umsitingin frá metingum viðv. endurgjaldi og kostnaði av niðurtøku.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, deildarleiðarin á stjórnarskrivstovuni og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). um farast skal undir samráðingar við Brigdehúsfelagið um yvirtøku av ognini í 2021 ella 2022.
b). um samráðingar ikki bera á mál so at heimila umsitingini at fáa tilnevnt metingarmenn um at áseta endurgjaldið.

Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam samtykti at taka undir við a og b og beina málið í fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Mentamálanevndini.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Samskifti hevur aftur verið við Bridgehúsfelagið um yvirtøku av bridgehúsinum og endurgjald í tí sambandi, nú torgverkætlanin er farin í gongd.

Ynski teirra er, at framtíðar staðsetingin av bridgehúsinum verður í ítróttaøkinum, og at talan er um teirra egnu høli, sum ikki eru minni enn verandi, tvs. uml. 250 m2. Kommunan hevur ikki slík høli at bjóða til leigu, so tí verður mest sannlíkt talan um nýbygging.
Felagið leigar grundøkið, sum bygningurin stendur á, frá kommununi.

Mett verður, at ein semja um endurgjald skal hava sum fortreyt, at felagið sjálvt byggir sær nýtt felagshús, og at kommunan endurrindar felagnum í mesta lagi kr. 2.500.000 fyri gamla Bridgehúsið. Grundøkið kann skipast í nýggjum langtíðarsáttmála.

Byggi- og býarskipanarnevndin skal viðgera staðsetingina.

Mett verður, at fígging til endurgjaldið kann játtast av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild at samráðast og gera avtalu um endurgjald fyri bridgehúsið í mesta lagi kr. 2.500.000 fíggjað av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

Mælt verður harumframt til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at staðseta nýggja bridgehúsið, og at møguligur leigusáttmáli um grundøkið verður at viðgera og samtykkja eftirfylgjandi.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald verður beint í býráðið um fíggjarnevndina, og málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið viðv. heimild at gera avtalu um endurgjald í býráðið.

Málið um staðseting av nýggjum bridgehúsi verður beint í byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Annika Olsen, atkvøður ímóti vísandi til, at eingin óheft meting fyriliggur av bridgehúsinum, ið kann verða grundarlag undir einari avtalu við felagið um endurgjald. Ynski er tó, at ein loysn verður funnin á hølisviðurskiftunum hjá felagnum.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.
Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti:**
Bridgefelagið hevur virkað í Gundadali í umleið 30 ár. Fólkini handan felagið hava eitt stórt ynski um, at verða verandi í Gundadali, hóast felagshúsið nú eftir ætlan verður tikið niður í sambandi við at økið skal brúkast sum partur av býartorginum í Gundadali, mál nr. 20/04581, Tórsvøllur Torg.

Ymiskar staðsetingar hava verið umrøddar í sambandi við at finna felagnum eina nýggja staðseting. Niðanfyri eru 4 staðsetingar í Gundadalsøkinum lýstar yvirskipað:

1. Býarskipanarliga er Gundadalur eitt øki, sum er um at verða fult útbygt. Heildarætlanin fyri Gundadali vísir tó á møguligar útbyggingarmøguleikar. Í heildarætlanini verður víst á økið millum HB- og B36-húsið. Hetta er eitt øki, sum í dag stendur óbygt, og sum partvíst kundi hóska seg til eitt bridgehús. Um byggjast skal á hesum stað, so skal alt økið byggjast, og hevði tað verið upplagt, at bygt tað við møguleika fyri áskoðaraplássum út móti ovara vølli, umframt at kjallarahæddin verður nýtt til okkurt hóskandi. Kjallahæddin skal helst brúkast av virksemi, sum partvíst kann húsast í myrkri, av tí at stórur partur av bygninginum verður undir jørð. Virksemið hjá Bridgefelagnum vildi helst hóska seg betri í ovaru hæddini, har inniklimaði kann gerast gott til kortspæl.
   Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðisparturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum, umframt at økið liggur í C3 í serstøku byggisamtykt nr. 3 og verður kannað ítróttum og tílíkum.
   Fyrimunur við staðsetingini er, at tað er rættiliga lætt at fara undir bygging á hesum stað.
   Vansar við staðsetingini er, at her skulu byggjast rættiliga nógvir fermetrar, sum møguliga ikki er hóskandi til Bridgefelagið, umframt at fótbólsfeløgini í fleiri umførum hava havt ymisk ynskir til økið.

2. Ein onnur staðseting, sum hevði hóskað seg væl til virksemið og teirra ynskir um at verða í Gundadalsøkinum, er í økinum við Tórsbreyt. Kring Tórsbreyt er møguligt at byggja rættiliga nógvar fermetrar, og eigur hendan loysnin at verða umhugsað sum ein framtíðar útbyggingarmøguleiki, bæði til at húsa ymiskum ítróttarligum virksemi, men so sanniliga eisini fyri at betra um veður og hølis avbjóðingarnar, sum virkandi ítróttarfeløgini á Tórsbreyt stríðast við. Við at staðseta bridgefelagið í hesum økinum, so kundi skjøtil verið settur á enn ein ítróttarmiðdepil, sum vildi gagnað fleiri enn bara Bridgefelagnum, tí tørvur er støðugt á fleiri hølum til ymisku ítróttagreinarnar, sum virka í høvuðsstaðnum.

Økið liggur í D2 í Almennu byggisamtyktini, har umráðispartarturin D2 verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.
Fyrimunir við staðsetingini er, at skjøtil verður settur á arbeiðið at menna Tórsbreyt til eina veruliga kappingarbreyt, umframt at møguleiki er fyri at staðseta fleirir ítróttargreinar á økið, sum í dag tørva fermetrar.
Vansar við staðsetingini er, at kommunan má luttaka við í planleggingini av økinum, umframt at tað møguliga verður ein longri tíðarhorisontur, tá Bridgefelagið einans hevur tørv á fáum fermetrum í økinum.

3. Ein triðja staðseting, sum hevur verið umrødd í sambandi við at vísa á eina staðseting til Bridgefelagið, er á matr. nr. 1268b, sum er økið beint yvir av verandi Bridgehúsi. Leigusáttmáli er galdandi fyri part av økinum, har ein privatur vinnubygningur stendur á leigaðum lendi hjá kommununi. Hóast leigusáttmálan, so eigur ikki at verða nøkur forðing í at byggja á hesum økinum. Í sambandi við at Tórsvøllur er bygdur, so er eitt parkeringskrav upp á 150 parkeringspláss, har 75 pláss skulu skipast inni á sjálvum byggiøkinum og kann restin teljast millum tey, sum longu eru í Gundadalsøkinum. Sum liður í at skipa Tórsvallar torgið verður økið aftan fyri Gundadalshøllina og økið sunnan fyri Gundadalsvegin skipað sum grøn parkeringspláss fyri at nøkta parkeringskravið frá UEFA, og verður vøkstur við til at skipa innrættingina og skapa eitt grønt umhvørvi.
   Økið liggur í C1 øki í serstøku byggisamtykt nr. 3, sum er lagt til miðstaðarbygging. Mest loyvda byggistig er 0,4 og mest loyvda nýtslustig er 0,8. Grundstykkið er 1250 $m^2$, og um bygt verður í einari hædd, kunnu í alt uml. 500 $m^2$ byggjast (inkl. aðrir bygningar á stykkinum).
   Fyrimunir við staðsetingini erfjór, at økið er lætt at fara til.
   Vansar við staðsetingini er, at ætlanirnar at innrætta parkeringsøkið og fríðka um í økinum tá ikki kunnu gerast og verður parkeringstørvurin helst óneyðuga stórur í hesum partinum at Gundadali.

4. Fjórða staðsetingin, sum hevur verið umrødd, er partur av matr. nr. 1292n, sum er á Oknarvegi, á vegnum til nýggja høvuðssæti hjá Bank Nordik. Matrikulin er 2000 $m^2$ til støddar, og rúmast Bridgefelagið væl á hesum økinum, og tískil kann hugsast, at bert ein partur av økinum skal setast av til Bridgefelagið.
   Økið liggur í umráðispartinum A í serstøku byggisamtyktini nr. 3 og er ætlað til sethúsabygging. Hóast økið liggur í sethúsaøki, so verður mett, at tað er grundarlag fyri at broyta ásetingarnar fyri økið, tí matrikulin er í beinleiðis sambandi við hotel- og bankavirksemið, sum annars í økinum.
   Fyrimunir við staðsetingini er, at økið er rímiliga lætt at fara til.
   Vansar við staðsetingini er, at byggisamtyktin skal broytast fyri at virksemið kann verða staðsett í hesum økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at fara í samráðingar við felagið um part av økinum á matr. nr. 1292n, Oknarvegur – staðseting 4.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2021:** Samtykt at fara víðari við staðseting 3.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Umrøtt.

**Ískoyti:**

Bridgehúsfelagið tekur undir við staðsetingini til nýggja Brigdehúsið á matr.nr. 1268b, sum byggi- og býarskipanarnevndin hevur samtykt.

Uppskot til semju fyriliggur, sum Bridgehúsfelagið tekur undir við. Upphæddin, sum kommunan skal endurgjalda felagnum fyri verandi Bridgehús, verður kr. 2,5 mió, ið er tann upphæddin, sum býráðið samtykti 29. apríl 2021. Møguligur yvirtøkudagur av húsinum verður at avtala nærri.

Aftrat skal kommunan játta íløgustuðul (konta 5370 stuðul til íløgur) til byggingina í mesta lagi kr. 1,5 mió svarandi til uml. triðingin av metta byggikostnaðinum. Henda játtan verður at rinda í tveimum líka stórum pørtum árni 2022 og 2023.

Endalig bygging er treytað av byggiloyvi, og herundir viðgerð hjá friðingarmyndug-leikunum av tí at talan er um bygging tætt uppat viðarlundini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til uppskotið um semju.

Um samtykt, mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at gera keypssáttmála fyri kr. 2,5 mió sbrt. hjálagda skeyti. Harumframt verður mælt til at fíggja íløgustuðul til nýtt Bridgehús á fíggjarætlanini fyri 2022 við upphædd kr. 750.000 og fyri árið 2023 kr. 750.000.

Mælt verður eisini til at gera leigusáttmála við Bridgehúsfelagið um part av lendinum matr.nr. 1268b, tá neyvari avmarking av grundøkinum er gjørd.

**Mentamálanevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Leigusáttmáli um lendi til nýggja húsið (kemur mánadagin 13. september 2021)

Umsitingin hevur verið í samráðingum við Brigdehúsfelagið um staðseting og eru komin ásamt um hjálagda uppskot til leigusáttmála.

Yvirtøkudagur gamla húsið
Ætlandi verður yvirtøkudagurin 2. november 2021. Hareftir húsið ætlandi verður tikið niður á várið 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, trivnaðarstjórin, býararkiteturin mæla nevndini til at innganga hjálagda leigusáttmála um lendi í 30 ár. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen, tekur ikki undir við málinum.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 blonkum atkvøðum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen, Gunvør Balle, Annika Olsen.

**Ískoyti:**

**Rætting viðv. kontering**
Í sambandi viðgerðina av keypi av brigdehúsinum í býráðnum 29. apríl 2021 var samtykt at játta 2.500 tkr. av løgukontu 5775, projektkontu - L57015 Langhylur - til at fíggja keypið.

Her skuldi av røttum verið fluttar 2.500 tkr. til aðra kontu, tí annars vil keypið av brigdehúsinum fara inn í byggi-/verkætlanarroknskapin fyri langhylsverkætlanina og geva eina skeiva mynd har.

Gjørd er nýggj projektkontu til endamálið - t.e. - L61010 Keyp av bygninginum - og verður so bókingin av keypinum flutt yvir eins og fíggingin.

**Niðurtøka av Bridgehúsinum**
Sbrt. sáttmálanum við Brigdehúsfelagið skal felagið vera farin úr húsinum pr. 30. apríl 2022. Tá virksemi so byrjar aftur eftir summarfrítíðina er ætlanin at tey fara at hava virksemi á onkrum fyribils stað inntil nýggja brigdehúsið verður klárt. Nýggja Brigdehúsið er í gerð og verður væntandi klárt at taka í nýtslu í oktober 2022.

Ætlanin er at fara undir niðurtøku av gamla brigdehúsinum í mai 2022. Søkt verður um loyvi frá byggivaldinum. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg. Niðurtøkan verður fíggjað av L57035 Tórsvøllur torg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, fíggjarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at flyta 2.500 tkr. av projektkontu- L57015 langhylur - til projektkontu - L61010 Keyp av bygningum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.
b). at heimila umsitingini at fara undir niðurtøku av gamla brigdehúsinum og at bjóða arbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg og fíggja arbeiðið av projektkontu L57035 Tórsvøllur torg.

Málið verður beint í fíggjanevndina.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við pkt. a, men tekur ikki undir við pkt. b vísandi til, at hon viðmælir, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión millum fleiri arbeiðstakarar.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 395<br><br>Formansins merki: |

# 86/22 Kvøldskúlin : Upptøkutreytir og málbólkur til føroyskt sum annaðmál (FSA1-3)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2022 | 79/22 | 22/00816-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 10.03.2022 | 25/22 | 22/00816-2 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 99/22 | 22/00816-2 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 07.04.2022 | 35/22 | 22/00816-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 96/22 | 22/00816-2 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 86/22 | 22/00816-2 |

**Upprunin til málið**
Leiðarin á Kvøldskúlanum og stjórin í Vinnuhúsinum.

**Lýsing av málinum**
Høvuðstilboðið í Tórshavnar kommunu og í landinum innan undirvísing í føroyskum máli fyri tilflytarar er 'føroyskt sum annaðmál 1-3'. Talan er um undirvísingartilboð, ið er mett at vera umleið hálva tíð – hvørt á 20 vikur. Higartil hevur tilboðið verið rættað til tilflytarar/útlendingar, ið hava varandi uppihaldsloyvi í Føroyum. Nokk av tilmeldingum er til tilboðið. Hvørt skeiðið kostar umleið 12 tkr. pr. næming. Onki egingjald er, tó er eitt depositum, ið næmingurin fær aftur um hann møtir nøktandi til undirvísing. Undirvísingin er vanliga gerandisdagar fyrrapartin.

Vinnuhúsið ger vart við at tey meta tað vera ónøktandi at aðrir útlendingar, ið eru í Føroyum og sum ikki hava varandi uppihaldsloyvi, ikki kunnu fáa møguleika at melda seg til hesi undirvísingartilboð. Talan er í høvuðsheitum um útlendingar, ið eru komnir í sambandi við arbeiði, antin úr ES-londum ella triðjalondum. Kravið til slík er at tey antin skulu arbeiða 30 tímar um vikuna, um tey eru ES-borgarar og annars 40 tímar um tey eru úr triðjalondum. Í onkrum førum hava tey eisini við sær samfylgjarar. Uppihalds- og arbeiðsloyvni hjá hesum útlendingunum er vanliga gjøgnum myndugleikan 'Styrelsen for international rekruttering og integatión, meðan tey, ið eru komin í sambandi við familjusameining koma gjøgnum 'Udlændingestyrelsen'.

Vinnuhúsið vísir eisini á uppskot til løgtingslóg um integratión (mál 22/00077), ið var til hoyringar hjá kommununi herfyri, ið leggur upp til at fyritreytin fyri at fáa varandi uppihaldsloyvi í framtíðini er, at viðkomandi tilflytari hevur ávísan førleika í føroyskum máli.

Í málinum eru fleiri tvístøður, ið politiska skipanin bæði kommunalt og hjá landinum eigur at viðgera nærri. Í fyrsta lagi er spurningurin um útlendingar, ið fyrst og fremst eru komin fyri at arbeiða, um tey skulu hava undirvísing í føroyskum í boði, og í øðrum lagi má støða takast til um tey ella arbeiðsgevari eiga at rinda fyri tað?. Í triðja lagi er spurningurin um at skapa karmar fyri at hesi, ið eru virkin minst 30-40 tímar um vikuna – nær hesi undirvísingartilboð skulu vera? Í fjórða lagi er spurningurin um hvørji skulu metingartættirnir vera í sambandi við upptøku til hesi tilboðini?

Tað tykist greitt, at talan er um tørv á eini munandi uppstigan av bæði starvsfólkaorku, samskipan og kørmum til hesi tilboð, umframt greiði á fíggingini. Neyðugt verður at fara undir greiningar av hesum viðurskiftunum og at fáa gjørt tilmæli til bæði Tórshavnar býráð og landsstýrið. Spurningurin er somuleiðis viðkomandi fyri aðrar kommunur í Føroyum og Kommunufelagið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, integratiónssamskiparin og mentamálaleiðarin mæla til at umsitingin saman við Uttanríkis- og Mentamáláráðnum, Útlendingastovuni, Kommunufelagnum vm um at taka nevndu viðurskifti upp og nágreina eitt dagført konsept viðvíkjandi upptøku av næmingum, møguligari arbeiðsgevaraábyrgd, uppstigan av starvsfólkaorku, harundir fasta setan, fígging vm., og at hetta verður lagt fyri nevnd aftur til víðari viðgerð.

**Mentamálanevndin 09. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Trivnaðarnevndin 10. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
**Undirvísarar í fast starv**
Kvøldskúlin og umsitingin eru í samskifti við Uttanríkis- og mentamáláráðið (UMMR) og Undirvísingarstýrið (UVS) um, hvussu skipanin innan økið kann fáast í eina fasta legu við fastsettum starvsfólki og sum kann veita undirvísingartilboð frá á heysti til móti sumri. Endamálið er at kunna røkka fleiri tilflytarum, bæði tey sum eru komin ísv. familjusameining, samfylgjarar hjá teimum sum eru komin í arbeiðsørindum og tey sum eru komin í arbeiðsørindum. Harumframt er ætlanin fyribils at halda fram við móttøkuflokkinum innan fólkaskúlaøkið. Harumframt er sannlíkt at skipanin eisini kemur at innganga í spurningin um flóttafólk úr Ukreina.

UMMR tykist vera tilreiðar at innganga slíkt samstarv við Tórshavnar kommunu.

Uppskotið er at seta 4 lærarar í fast starv og at hesi hava brøkar millum 0,65 og 0,85. Tey sum undirvísa í løtuni eru frá ymiskum yrkisfakligum bakgrundum og er tí hugsanin at lýsa størvini sum at vera sett sbrt. avvarðandi yrkisfelag og vil tað í hesum føri vera á.v.v. Føroya lærarafelag, Akademikarafelagið og Yrkisfelagið. Lønirnar sbrt. hesum sáttmálum eru stórtsæð á sama støði.

Hugsanin er at lýsa størvini her í vár/summar og til starvsbyrjan pr. 1. August 2022. Skipanin er treytað av at UMMR/UVS gevur TK eina tilsøgn um tikið verður undir við skipanini og at TK kann rokna við at fáa minst eina upphædd, ið svarar til ta norming, ið TK hevur í hyggju at seta. Tó skal gerast vart við at tá talan er um føst størv, so vil TK tá vera bundið av skyldum sbrt. sáttmála um t.d. ísv. fráveru og tí kunnu støður íkoma har fíggingin frá landinum ikki altíð røkkur heilt. Harumframt koma nakað av útreiðslum til skrivstovuhald og samskipan, ið TK kemur at bera.

Sí hjálagt skjal viðv. 'Setanarviðurskifti hjá lærarum í 'Føroyskum sum annaðmál' og 'FSA 1-2-3 tímar tils. 2022-2021', ið er uppskot til tímar frá UMMR/UVS fyri skúlaárið 2022/23. Uppskotið fevnir ikki um tímar til móttøkuflokkin innan fólkaskúlaøkið.

**Vinnuhúsið og útlendingar í arbeiðsørindum**
TK hevur verið í samskifti við Vinnuhúsið saman við UMMR og Kvøldskúlanum. Vinnuhúsið heldur at Kvøldskúlaskipanin skal veita ókeypis undirvísing til tey sum eru í Føroyum í arbeiðsørindum og eigur at vera fleksibul tilboð í mun til nær á degnum og í vikuni undirvíst verður.

Verandi normering ber ikki at hava nógv fleiri næmingar og í verandi støðu og við verandi praksis er bert kapasitetur til tey, ið hava fast uppihaldsloyvi og kanska eitt sindur afturat, men tað kann broytast.

Umsitingin metir at tað kundi hugsast ein fleksibul skipan har Kvøldskúlin bjóðaði undirvísingartilboð til vinnuna t.e. innan matstovuvinnu, byggivinnu etc., men at har lág eitt gjald pr. næming, ið arbeiðsgevarin rindar heilt ella lutvíst ella í øðrum lagi at landið og kommunan semjast um ein fíggingarleist. Hetta er ikki greitt í verandi støðu.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at geva tilsøgn til Tórshavnar Kvøldskúla um at kunna lýsa 4 parttíðarstørv, treytað av at UMMR/UVS geva nøktandi tilsøgn til fígging
b). at fara í samráðingar við UMMR um ein leist fyri tey sum eru komin til Føroya í arbeiðsørindum.

Málið verður beint í fíggjarnevndina umvegis trivnaðarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina um trivnaðarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 07. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

## 87/22 Verkløg við Hoyvíksvøll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 182/20 | 20/01962-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 172/20 | 20/01962-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.06.2020 | 212/20 | 20/01962-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 25.06.2020 | 188/20 | 20/01962-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 145/20 | 20/01962-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 236/20 | 20/01962-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 22.02.2021 | 39/21 | 20/01962-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.03.2021 | 62/21 | 20/01962-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 93/21 | 20/01962-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 85/21 | 20/01962-1 |
| 11 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 115/21 | 20/01962-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 162/21 | 20/01962-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 06.04.2022 | 106/22 | 20/01962-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 95/22 | 20/01962-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 87/22 | 20/01962-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt í fíggjarætlanini 2020 løgukonta 5775 upphædd 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við støði í tøku játtanini til vøllin í Hoyvík í 2020 er hóskandi at fáa ásett, hvussu játtanin skal raðfestast fyri 2020. Málið hevur higartil verið viðgjørt í máli 18/00009 Fótbóltsfelagið FC Hoyvík : Felagshús við Hoyvíksvøll og máli 18/03857 Undrið FF : Virksemi og hølisviðurskifti felagsins**.**

Men av tí at FC Hoyvík trekti aftur umsóknina um fyribils felagshús við Hoyvíksvøll aftur, verður mett meiri yvirskoðiligt at byrja málið av nýggjum.

Felagið skrivaði 27. mai 2020: "Vit fara nú at hugsavna okkum um tað endaligu loysinina, sum Tórshavnar kommuna hevur samtykt at gera í 2021-22 og har kr. 1 mio. er sett av í 2020 til at fyrireika endaligu loysnina."

Lýsing av málinum

Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2020 eru avsettar 1.000 tkr. á løgukontu 5775 til vøllin í Hoyvík. Umframt at tað í útmeldaðu langtíðarløguætlanini er lagt upp til fígging til vøllin í Hoyvík í 2021 og 2022. Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 1.000 tkr. til vøllin í Hoyvík, t.e. játtan til at útvega fyribils felagsumstøður og aðrar batar á kringumstøður, umframt ætlaðar 10.000 tkr. til 2021 og 15.000 tkr. til 2022.

**Trappur norðanfyri og aðrar fríðkanir**
Ítróttaanlegg hevur gjørt eina fyribils loysn so viðurskiftini eru forsvarligt, men hevði verið ynskiligt at sett minni upphædd av til ymiskar betranir og fríðkanir av økinum í 2020 ella 21. M.a. við støði í máli 20/00040 Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll.

**Girðing sunnanfyri**
Best var um girðingin var gjørd í 2020 og verður tí mælt til at seta 200 tkr. av av hesi løgujáttan til endamálið saman við somu upphædd á kto. 5717 Ítróttaanlegg. Málið er at arbeiðið er útint í 2020.

**Byggiskrá**
Um ætlanin er at fremja størri byggiverkætlan komandi árini við Hoyvíksvøll við felagshúsi til fótbóltsvirksemi o.a., er hóskandi at fara undir at gera byggiskrá í 2020 ella 21. Hetta kann í høvuðsheitum vera gjørt innanhýsis, men við ávísari ráðgeving. Til endamálið kundu 150 tkr. verið settar av.

**Aðrir tørvin innan ítróttaøkið v.m.**
Mett verður hóskandi at lata ávísa upphædd av hesi løgujáttan vera tøka til møguligar tørvir innan ítróttaøkið. M.a. viðv. máli '19/04413 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu: Støðan og framtíðar løgutørvur' har ikki øll viðurskifti eru avkláraði enn og kann vera møguligur eykatørvur. Hetta verður ætlandi greitt til komandi eyka fund í nevndini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:

a). at samtykkja at játta 200 tkr. til girðing sunnanfyri
b). at taka støðu til um farast skal undir at gera byggiskrá í 2020 ella 2021 til nýtt felagshús við Hoyvíksvøll til fótbóltsfeløgni og annað viðkomandi virksemi
c). at flyta 1.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við a og c í tilmælinum. B verður tikið upp aftur á seinni fundi.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at byggiverkætlanin Skúlin á Fløtum verður liðug í næstum er ikki longur brúk fyri byggiplássskúrunum, ið kommunan eigur har á Janusargøtu 15. Talan er um fýra skúreindir á umleið 75 m2 hvør, sum upprunaliga vórðu brúktar sum undirvísingarhøli aftanfyri Sjónleikarahúsið. Harumframt ein vesi-bingja.

Vegna virksemi við og kring Hoyvíksvøll, verður mett áhugavert sum loysn í nøkur ár, at flyta tvær av hesum eindunum og vesi-bingjuna til økið eystanfyri Hoyvíksvøll, at brúka til ymiskan tørv hjá feløgunum og stovnum, ið virka við og kring Hoyvíksvøll, tó ikki beinleiðis sum felagshøli góðkend av FSF sbrt. vallarreglugerðini.

Ítróttaanlegg kann umsita hølini og gera brúksavtalur við viðkomandi feløg og stovnar.

Til at flyta hesar tvær eindirnar og at gera klárt við fundamenti, íbindingum v.m. verður mett at vera tørvur á umleið 250 tkr. Harumframt er neyðugt at søkja um byggiloyvi.

**Tilmæli**:

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 250 tkr. av løgujáttani 5775 ætlað Hoyvíksvølli til verkætlan við tveimum skúreindum við Hoyvíksvøll. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 25. juni 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við Mentanmálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við Mentamálanevndini og mælur til at onnur, varandi loysn verður funnin á hølisviðurskiftinum við Hoyvíksvøll.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá umboðunum hjá Javnaðarflokkinum: Mælt verður til at finna aðra, varandi loysn á hølisviðurskiftunum við Hoyvíksvøll.

Broytingaruppskotið fall við 6 atkvøðum fyri, 7 ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marni Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá einari samdari fíggjarnevnd 17. juni 2020 og meirilutanum í fíggjarnevndini 25. juni 2020, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri, fimm blonkum og einari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**:
Skúrar við Hoyvíksvøll
Síðani viðgerðina seinast hevur umsitingin saman við ráðgeva verið í sambandi við byggivaldið um ætlaðu ætlanina. At seta ætlaðu skúreindirnar upp eystanfyri Hoyvíksvøll vil innibera at tað gerst heldur trongt millum íbúðarhúsini og skúrarnar og til vallargirðingina, umframt at tað verður neyðugt við brunaveggi. Tískil verður mett meiri hóskandi at seta 3 bingjur upp uppá longs t.v.s. bingjur sum eru umleið 10 metrar langar og 4 metrar breiðar. Vansin er tá at ein síða tá skal ein nýggjur útveggur gerast av í hvørjari bingju, umframt at samlaða fermetratalið verður ¼ minni enn ætlað. Til tess verður mett neyðugt at kunna brúka 75 tkr. afturat, umframt upphæddina á 250 tkr., ið longu er játtað. Ætlanin er at gera avtalu við fótbótsfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF um brúk av høllunum, umframt møguleiki hjá stovnum í kommununi at fáa ávísa atgongd til hentleikarnar.

Gerð av byggiskrá

Um ætlanin er at fara undir at byggja felagshús við skýli v.m. í 2021 ella 22 er viðkomandi at taka støðu til um farast skal undir at gera byggiskrá fyri eina slíka bygging. Skotið verður upp at játta 100 tkr. til endamálið. Ein byggiskrá verður gjørd í tvørgangandi samstarvi í umsitingini og kemur eisini at inndraga viðkomandi uttanhýsis áhugapartar.

Búskapur
Til Hoyvíksvøll eru 800 tkr. tøkar í ár. 200 tkr. eru játtaðar til girðing sunnanfyri. 250 tkr. játtaðar til skúrar. Í hesum umfari verður skotið upp at játta 50 tkr. eyka til skúrar og 100 tkr. til gerð av byggiskrá. Sostat eru 200 tkr. eftir. Skotið verður upp at tær vera brúktar til fríðkanir og betranarátøk kring leikvøllin. Herundir at tryggja skráan frá p-økinum norðanfyri omanmóti leikvøllinum o.a. Arbeiðið verður gjørt í samstarvi við býarskipanardeildina og inngongur sum partur av tilgongdini at gera betranarátøk fyri trygd og trivna við Karlamagnusar breyt.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). At játta 50 tkr. afturat til skúrar
b). At fara undir gerð av byggiskrá fyri einum komandi felagshúsi og játta 100 tkr. til endamálið.
c). At játta 200 tkr. til fríðkanir og betranarátøk kring Hoyvíksvøll.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum tó soleiðis, at loysn við skúrum er fyribils, og at játta nevndu upphæddir av kontu 5775 Ítróttaranlegg L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll.

Heðin Mortensen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Annfinn Brekkstein, nevndarformaður, skjýtur upp at broyta verkætlanina við fyribilshølum til felagsvirksemi soleiðis, at staðsetingin verður vestanfyri vøllin, tí loysnin eystanfyri vøllin er ov órógvandi fyri grannarnar.

Umsitingin skal viðmerkja, at hetta krevur nýggja byggimálsviðgerð eins og metast skal um, hvussu slík loysn kann fremjast antin við teim skúrum, sum nú standa eystanfyri, ella aðrari loysn, sum kann fáa longri byggiloyvi enn 2 ár. Roknast skal við ávísum fíggjartørvi í sambandi við broytingina.

Tann varandi loysnin við skýli og felagshølum, ið lúka krøvini hjá FSF, er eisini ætlað at vera vestanfyri. Samtykt er at gera byggiskrá. Mett verður skilagott, um mentamálanevndin eisini tekur støðu til, um hetta arbeiðið skal raðfestast ella útsetast.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka støðu til uppskotið og um samtykt, at umsitingin fyrireikar broyttu verkætlanina at leggja aftur fyri nevndina, harundir kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 22. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Grannaklaga**
Kommunan fekk í februar 2021 klagu og fyrispurning frá granna við Karlamagnusarbreyt viðv. skipan av økinum eystanfyri Hoyvíksvøll og staðseting av skúrunum.

**Hoyringsfundur við FC Hoyvík og Undrið FF**
Á fundi við feløgini í mars 2021 vóru ætlanirnar við Hoyvíksvøll viðgjørdar við feløgini, og herundir uppskot frá borgarstjóranum um at flyta skúrarnar til økið yvir av p-økinum við Skúlan við Løgmannabreyt. FC Hoyvík mælti staðiliga til at halda fast við eina loysn har skúrarnir standa við sjálvan vøllin, meðan Undrið FF skilti sjónarmiðini hjá FC Hoyvík, men eisini kundi góðtaka loysn við p-økið.

**Uppskot frá borgarstjóranum um broytta loysn**
Heðin Mortensen, borgarstjóri setir fram uppskot um at fáa broytt ætlanina soleiðis at skúrarnir vera settir øðrvísi í økinum. Ein loysn er at 3 skúrar av 4 vera settir norðanfyri atkomuna til vøllin við Karlamagnusarbreyt og ein sunnanfyri og onnur har allir 4 skúrarnir vera settir norðanfyri.

**Innleiðandi metingar hjá umsitingini**
Til at lýsa uppskotið er gjørdar hjáløgdu yvirlitstekningar.

Skúrarnir hava eina frástøðu á umleið 4 metrar frá vallargirðingini og umleið 6 metrar til grannastykkini eystan til. Verður farið inn á økið norðanfyri atkomuna til vøllin vil tað innibera jørð- og betongarbeiðið, so sum grevstur, spreinging/brekking, flyting av tekniskum leiðingum, stuðlamúr v.m. Alt eftir, hvussu langt verður farið norður, gerst arbeiðið dýrari vegna vaksandi hæddarmun. Í verandi støðu er ikki gjørligt at siga neyvt um kostnaðin, men eru á løgukontu 5775 fyri 2021 - 2.500 tkr. tøkar til Hoyvíksvøll og er sannlíkt at verkætlanin væl rúmast innanfyri hesa játtan, men vil neyvari tilgongdin avklárað tað nærri.

Um málið verður samtykt vil ein nýggj verkætlan og kostnaðarmeting kunna vera tøk innan fáar vikur, og er í sofall ætlanin beinanvegin at fara undir tilgongdina við byggimálsviðgerð. Umsitingin metir eisini at ein loysn har 2 skúrar standa hvørjumegin atkomuna, eisini hevði verið viðkomandi at fingið kannað.

Sbrt. galdandi byggisamtykt er loyvt at byggja í geiranum eystanfyri Hoyvíksvøll sbrt. nærri ásetingum og byggiloyvi. Í fall broytingar vera gjørdar er ætlanin at hava kunningarfund fyri feløgunum og grannum um nýggju uppskotini. Í sambandi við arbeiðið norðanfyri atkomuna vera endaligu marknaviðurskiftini við grannastykkini har eisini endaliga avklárað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til, um at fara undir greining av broyttari staðseting av skúrunum, har 3 ymiskar uppsetingar vera kannaðar og at koma aftur í nevnd til komandi fund við tilmæli um loysn við kostnaðarmeting v.m.

**Mentamálanevndin 15. mars 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
**Skúrar flytast longur norðureftir**
Fyri at fáa praktisku viðurskiftini á staðnum at ganga betri upp er gjørt uppskot til eina nýggja staðseting har skúrarnir eru fluttir nakað longur norður enn upprunaliga hugsað. Henda loysnin gevur fleiri møguleikar fyri ymiskum aktiviteti í økinum eystanfyri Hoyvíksvøll, og er eitt minni inntriv í mun til grannalagið. Sí hjáløgdu tekningar.

Talan er um loysn, ið Ítróttaanlegg hevur arbeitt við saman við ráðgeva. Loysnin inniber eina umskipan av atkomuni til vallarøkið og sum samstundis uppfyllir tørvin bæði fyri vanligari atkomu hjá fólki til gongu og fyri tænastuferðslu hjá Ítróttaanleggum. Tillagaða loysnin hevur fingið byggiloyvi. Loysnin er eisini viðgjørd við fótbóltfeløgini FC Hoyvík og Undrið FF.

Henda loysnin hindrar ikki eina framtíðar skipan av økinum og er ætlanin er at koma við einari dagførdari heildarætlan fyri økið seinni í ár. Ein ætlan var gjørd í 2018, ið tørvar dagføringar og fáa eina meiri formliga viðgerð. Á løgukarminum fyri 2021 5775 eru 2.500 tkr. ætlaðar Hoyvíksvøll.

Ætlanin er eisini at koma við tilmæli í vár um hóskandi brúk av tøku upphæddini.

Sp/f Røkin hevur longu arbeiðið at gera neyðugar tillagingar fyri at gera skúrarnar og er hóskandi at sama felag kann standa fyri hesum eyka arbeiðinum. Arbeiðið er mett til umleið 385 tkr. og er harumframt tørvur

á nakað av fígging til ókent, evt. tilkeyp, flyting av skiftibenrum vesturum og ráðgeving, umframt kommunalt MVG – sett til 430 tkr.

Ætlandi verður farið undir arbeiðið skjótast tilber.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). At fara undir eina tillagaða loysn har skúrarnir við Hoyvíksvøll vera fluttir longur norður.
b). At flyta 2.500 tkr. av løgukarminum 5775 á projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Annika Olsen varð ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Væntandi verður fyribils hølisloysnin við Hoyvíksvøll klár at taka í nýtslu í juli 2021. Sum liður í menning av hentleikunum og funktiónini hevði verið hent við nøkrum grundleggjandi skiftirúmshentleikum í hølunum við brúsu og vesum. Hetta er ynskið frá feløgunum. Mett verður at ein loysn kann gerast fyri 800 tkr. Hugsanin er at fáa heintað inn undirhondsboð frá tveimum veitarum til at gera arbeiðið. Væntandi kann arbeiðið byrja í summar og verða liðugt týðiliga í heyst.

Á projektkontuni fyri verkløg við Hoyvíksvøll er henda upphædd tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um at fara undir gerð av skiftirúmshentleikum í fyribils hølunum við Hoyvíksvøll og at heimila umsitingini at gera sáttmálar innan ein fíggjarkarm á 800 tkr.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Á sumri 2020 samtykti mentamálanevndin at játta 200 tkr. av projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll og at sama upphædd skuldi fara av kontu 5717 Ítróttaanlegg.

Á várið 2021 var arbeiðið boðið út og skuldi takast av betra tilboðnum, ið var frá HVT. Tá arbeiðið skuldi fara í gongd bað eigarafelagið um at fáa arbeiðið útsett til út á heystið, hetta tí at annars vildi ampin vera óv stórur tær vikurnar ongin girðing fór at vera. Samskifti dróg út og endin var at HVT ikki vildi standa við tilboðið longur vegna m.a. hækkaðar stálprísir v.m.

Síðani er farið undir at kanna um onnur – meiri byggibar – loysn kann gerast og at fáa tað bjóðað út. Ætlandi verður tað nú í apríl 2022 og er so ætlanin at gera arbeiðið skjótast tilber.

Á projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll eru umleið 800 tkr. tøkar. Arbeiðið við lonunum er ikki liðugt uppgjørt, men verður eitt sindur hægri enn áður mett.

Á kontuni er áður ætlað at brúka 100 tkr. til gerð av byggiskrá. Stórur tørvur er í økinum at fríðkað um, jarðfesta skráar v.m.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at bjóðað arbeiðið út av nýggjum og at gera sáttmála fyri upp til 600 tkr. At játta av projektkontu L57034.

**Mentamálanevndin 06. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

## 88/22 Útstykking oman fyri Argjahamar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2021 | 102/21 | 21/01777-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 115/21 | 21/01777-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 162/21 | 21/01777-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 180/21 | 21/01777-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 143/21 | 21/01777-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 52/21 | 21/01777-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 216/21 | 21/01777-1 |
| 8 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 224/21 | 21/01777-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 22/22 | 21/01777-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.03.2022 | 76/22 | 21/01777-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 93/22 | 21/01777-1 |
| 12 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 61/22 | 21/01777-1 |
| 13 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 88/22 | 21/01777-1 |

**Upprunin til málið**
Stóri bústaðartørvurin í Tórshavnar kommunu.

**Lýsing av málinum**
Tórshavn eins og aðrir høvuðsstaðir er í teirri støðu, at tey flestu vilja búgva her. Sum høvuðsstaðarkommuna mugu vit ganga á odda til tess at finna loysnir á bústaðarøkinum. Í hesari tilgongd vilja vit skapa eina burðardygga býarmenning, har rúm er fyri øllum, har vit tætta býin og har vit gagnnýta býin skynsamari. Harumframt er tað týdningarmikið, at vit sum kommuna standa á odda fyri at veita fjølbroyttar bústaðir, bæði eigara- og leigubústaðir.

Stórur fólkavøkstur er, umframt at húskini minka alsamt. Kommunuætlanin frá 2020 vísir á, at tørvur verður á íalt 10200 bústøðum í 2032 roknað frá 2018.

Tískil er tað týdningarmikið, at kommunan eisini sjálv stendur á odda fyri at veita borgarum bústaðir, samstundis sum hon samstarvar við virkandi innan privatu vinnuna um partar av hesi uppgávuni.

Bústaðarsløgini eru vanliga býtt upp í sethús, tvíhús/raðhús og íbúðir. Tað eru nógv sum ynskja at búgva í sethúsum, umframt at vit síggja ein størri og størri áhuga fyri íbúðum. Enn manglar kommunan eitt útboð av leigubústøðum, meðan vit hava seinastu árini havt nógvar útstykkingar við íbúðum.

Kommunuætlanin vísir á ymisk lendi til býarvøkstur, har Stóratjørn stendur at verða best egnaða lendið til býarvøkstur og økið Klingurstjørn er næstbesta staðseting. Arbeitt verður við ætlanunum á Stórutjørn, og er ætlanin nú at fara í gongd við eina ætlan oman fyri Argjahamri, sí kortskjal nr. 21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri.

Viðlagda kortskjal er ein skitsa av hvussu økið kann verða skipað við bústøðum, bæði set- , raðhúsum og íbúðum, umframt at øki verður lagt av til møguliga stovnsbygging. Neyðugt verður at umsitingin tillagar uppskotið, soleiðis at skipanin av økinum verður nøktandi, umframt at hetta kortskjalið er ikki heilt í samsvar við tað, sum er avtalað við festaran á økinum. Ymisku byggistigini síðani skulu projekterast.

Lendið, matr. nr. 4a, sum ætlanin er at fara undir at skipa til bústaðarbygging og stovnsbygging, er ogn hjá Búnaðarstovuni, har Poul Müller er festari á lendinum. Samlaða økisvíddin, sum er avtalað við festaran at fara undir at skipa sæst á kortskjalinum nr. 21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking, er sambært kortskjalinum uml. 128.000 fermetrar til støddar.
Uppskot til ætlanaravtalu við festaran er gjørd og viðheft, sí skjal nr. 21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller.

Ætlanaravtalan fevnir bæði um lendið til útstykking, umframt lendið til Viðarlund, matr. nr. 4a og matr. nr. 43a, sí kortskjal nr. 21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund.

Samanlagt er talan um á leið 163.000 $m^2$, ið Tórshavnar kommuna skal keypa og frábýta frá Búnaðarstovuni til ætlaðu útstykkingar- og frílendisendamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Lóg um landsjørð

**Upplýsingar frá umsitingini**
Støða skal takast til, hvat slag av bústøðum økið skal skipast til, hvussu stór grundstykkini skulu vera og hvussu fríøkini í útstykkingini verða skipaði og tryggjaði. Harumframt er týdningarmikið, at útstykkingin í størstan mun tillagar seg lendið og at eitt nú leiðin niðan á Kongavarða verður varðveitt.
Ein umhvørvis árinismeting eigur at verða gjørd av lendinum, áðrenn farið verður undir at skipa tað endaligt, soleiðis at atlit kunnu verða tikin til serlig viðurskiftir í økinum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
21/01777-3, Uppskot til útstykking oman fyri Argjahamri
21/01777-4, Uppskot til ætlanaravtalu millum Tórshavnar kommunu og Poul Müller
21/01777-5, Argjahamri_Viðarlund
21/01777-6, Lendi at keypa frá Búnaðarstovuni til nýggja útstykking

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býarakitekturin mæla til:

- At lendið, sambært kortskjali 21/01777-6, verður lagt av til nýggja útstykking í kommununi, og at umsitingin fer undir at skipa økið neyvari.
- At heimila umsitingini at bjóða projekteringina út.
- At ætlanaravtalan, skjal nr. 21/01777-4, verður samtykt.
- At heimila umsitingini at søkja Búnaðarstovuna um at keypa lendið sambært kortskjali 21/01777-5 og 21/01777-6.
- At málið verður beint aftur í nevnd, tá samlaði lendiskostnaðurin er kendur.
- Og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Tórshavnar kommuna hevur fingið tilsøgn frá Búnaðarstovuni um keyp av lendi til ætlaðu útstykkingina á Argjahamri. Umsóknin hevur verið til ummælis hjá festaranum, sum ikki hevur viðmerkingar til ætlanirnar hjá kommununi. Kommunan skal rinda umleið 15 mió. kr. fyri at ogna sær lendið v.m., og kemur hesin peningur heilt ella lutvíst inn aftur, tá ið grundøkini í útstykkingini verða seld. Mælt verður til at fíggja keypið av tøkum peningi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at játta kr. 15 mió. av tøkum peningi til keyp av lendi til nýggja útstykking omanfyri Argjahamar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Í tilsøgn dagfest 16. juni 2021 hevur Búnaðarstovan útgreinað samlaða kostnaðin, ið Tórshavnar kommuna skal rinda fyri útvegan av lendi til ætlaðu útstykkingina omanfyri Argjahamar. Samlaðu útreiðslurnar fyri kommununa verða umleið 13 mió. kr., ið mælt verður til at játtað av tøkum peningi.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá Tórshavnar kommuna hevur fingið til vega lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn, og lendið sunnan fyri verandi útstykking á Hamrinum, er neyðugt við eini tilgongd at fyrireika økið til byggibúning.

Lendið oman fyri Argjahamar og Klingurstjørn og lendið uttan fyri Argjahamar er soleiðis háttað, at tað er av størsta týdningi, at greiða fyrst fæst á, hvussu infrakervið í økinum verður skipað fyri á optimalan hátt at knýta saman byggilendi. Eisini er neyðugt út frá hesum at gera skipanaruppskot fyri byggingina, grøn øki, parkering o.s.fr. Til hetta krevst ein projektering av vegum, leiðingum og møguligum byggiøkjum í 3D.

Mett verður, at hetta projekteringsarbeiðið til skipanaruppskot í fyrstu syftu kann gerast av uttanhýsis ráðgeva innan fyri eina rammuupphædd á kr. 200.000,-. Málið verður lagt aftur fyri nevnd, tá innleiðandi projekteringsarbeiðið er komið á mál uml. einar 4 vikur eftir at peingurin er játtaður.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 200.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan, "Útstykking oman fyri Argjahamar" undir kt. 6475, Byggibúning bústaðir, og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og bárskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri broyting, at peningurin verður játtaður av kto 6475 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Prosjekteringsarbeiði til skipanaruppskot er framt og handað umsitingini. Arbeitt verður fram ímóti, at gera útboðstilfar, at bjóða arbeiðið út eftir. Til hetta arbeiðið og onnur arbeiðir í sambandi við fyrireikingar av útstykkingini verður mett, at tørvur er á upp til kr. 2.000.000,- í 2022.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtað verður kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, at fremja fyrireikingararbeiði til at seta útstykkingararbeiðið í gongd. Hetta verður fíggjað av keyp og sølu.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tá tað í heyst varð farið undir at skipa útstykkingina oman fyri Argjahamar, tá var hægsta raðfestingin at fáa lagt vegin so skynsamt sum gjørligt í lendið, fyri síðani at planleggja ítøkiligu byggingina á staðnum. Yvirskipaða skipanin av økinum er nú liðug og sæst á hjálagda skjali "*Uppskot_Útstykkingar oman fyri Argjahamar_Støðumynd*" j.nr. 21/01777-30.
Hendan skipanin, í mun til hvørji bústaðarsløg í síðsta enda fara at verða loyvd í økinum, kann broytast í tilgongdini, men er ætlanin at fyrihalda seg í størstan mun til hesa skipanina.

Sum omanfyri greitt frá, so hevur tað alla tíðina verið týdningarmikið at fáa lagt vegin rætt, og er fyrsta strekkið av vegnum nú liðugt projekterað og klárt at bjóða út. Talan er um vegastrekkið frá rundkoyringini á Argjahamri og út til vegin hjá festaranum, sum leiðir allan vegin út í grótbrotið á Glyvursnesi. Hetta strekkið, sum verður boðið út, er uml. 600 m.

Til hetta ítøkiliga vegastrekkið, sum verður ein sambindingarvegur í útstykkingini, knýta so hinir vegirnir seg í, og útfrá teimum verða so áleið 200 bústaðir og barnagarðurin knýttir í.

Ætlanin er, at hetta ítøkiliga vegastrekkið verður fíggjað av komandi bústøðum og barnagarðinum. Hetta er líknandi tilgongd, sum vit kenna frá eitt nú Løgmannabreyt og Karlamagnusarbreyt.

Ætlanin er at fara undir framhaldandi projekteringina av útstykkingini beinanvegin, soleiðis at tá sambindingarvegurin, sum nú fer í útboð, er liðugt bygdur, so er klárt at fara undir írestandi vegir og fyri síðani at bjóða økir til bústaðarbygging út.

Til hesir arbeiðir verður mettur ein fíggjarligur tørvur á kr. 6 mió. har uml. 4 mió. kr. fara til bygging av sambindingarvegnum og 2 mió. kr. fara til framhaldandi planlegging og projektering av útstykkingini.

Ætlanin er at játta peningin av tøkum peningi, sum krevur tvær viðgerðir í býráðnum. Til aðru viðgerð í býráðnum er ætlanin at koma við eini nærri lýsing av málinum, har ein ítøkilig tíðarætlan, kostnaðarætlan og søluætlan fyriliggja.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- At heimila umsitingini at bjóða sambindingarvegin út og at gera sáttmála við vinnandi arbeiðstakaran.
- At heimila umsitingini at halda fram við projekteringini av útstykkingini.
- At játta kr. 2.000.000,- á verkætlan L64019 Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- At játta kr. 4.000.000,- á verkætlan L64019, Útstykking oman fyri Argjahamar undir konto 6475 Byggibúning bústaðir, fíggjað av tøkum peningi.
- Verkætlanin verður eftir ætlan fíggjað við inntøku frá sølu av grundstykkjum til bústaðir og barnagarð innanfyri umleið 1 ár.
  At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

## 89/22 Skipan av Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2018 | 206/18 | 18/03468-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 10.10.2018 | 285/18 | 18/03468-1 |
| 3 Býráðsfundur | 25.10.2018 | 250/18 | 18/03468-1 |
| 4 Býráðsfundur | 29.11.2018 | 276/18 | 18/03468-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.09.2019 | 150/19 | 18/03468-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 244/19 | 18/03468-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.10.2019 | 280/19 | 18/03468-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 06.11.2019 | 181/19 | 18/03468-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 30.10.2019 | 292/19 | 18/03468-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.10.2019 | 259/19 | 18/03468-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 315/19 | 18/03468-1 |
| 12 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 276/19 | 18/03468-1 |
| 13 Býráðsfundur | 12.12.2019 | 309/19 | 18/03468-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 18.05.2020 | 110/20 | 18/03468-1 |
| 15 Býráðsfundur | 28.05.2020 | 106/20 | 18/03468-1 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 15/21 | 18/03468-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 26/21 | 18/03468-1 |
| 18 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 61/21 | 18/03468-1 |
| 19 Býráðsfundur | 25.03.2021 | 99/21 | 18/03468-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.01.2022 | 4/22 | 18/03468-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 16/22 | 18/03468-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 15/22 | 18/03468-1 |
| 23 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 74/22 | 18/03468-1 |
| 24 Tekniska nevnd | 07.03.2022 | 23/22 | 18/03468-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 83/22 | 18/03468-1 |
| 26 Fíggjarnevndin | 23.03.2022 | 92/22 | 18/03468-1 |
| 27 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 72/22 | 18/03468-1 |
| 28 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 89/22 | 18/03468-1 |

**Upprunin til málið:**
Tórshavnar kommuna er í menning, og stóri fólkavøksturin merkist serliga í høvuðsstaðarøkinum. Tørvur er á at víðka um býin, og í hesum sambandi verður farið undir arbeiðið at skipa Stórutjørn, matr. nr. 135ed og 1æf, Hoyvík – økið norðanfyri Klingruna og vestanfyri býlingin Inni á Gøtu, sum er uml. 525 ha til støddar, sí skjal *Stóratjørn*.

Geografiskt liggur økið væl fyri, millum bústaðarøkið í Hoyvík, vinnuøkið á Hjalla og nýggja innkomuvegin, sum verður gjørdur í sambandi við Eysturoyartunnilin.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Í kommunuætlanini hjá Tórshavnar kommunu er Stóratjørn eitt av teimum økjunum, ið mett veður at hóska seg væl til býarvøkstur. Í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu liggur økið í A3 øki, sum er ætlað blandaðari bústaða- og miðstaðabygging, D2 øki, ætlað ítrótti og øðrum, sum kann virka saman við ítróttinum og D1 øki, sum er økið nýggi kirkjugarðurin í Hoyvík liggur í.

Sum ein liður í at útvega nýtt byggilendi í kommununi, tað verði seg til bústaðir, vinnu, ítrótt, mentan o.a., er ætlanin í fyrsta umfari at bjóða arbeiðið at skipa økið við Stórutjørn út til uttanhýsis ráðgeva.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A3 øki eru m.a.:

- *Økið verður lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging, har loyvt er at hava handlar, smáhandverk og minni virkir, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*
- *Útstykkingar kunnu bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.*
- *Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá tal av hæddum og verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju, (víkja frá ásettu byggi- og nýtslustigunum og minstu grundstykkjavídd).*

Ásetingar fyri D1 øki:

- *Umráðispartarnir D1 verða í síni heild lagdir til almenning, náttúrufriðingar- og mentunarlig endamál og tílíkt. Økið fram við Hoydalsá kann einans verða skipað og bygt sambært serstakari byggisamtykt fyri økið.*
- *Bygging í D1 kann bert loyvast sambært serstakari byggisamtykt, sum er í samsvar við stk. 1.*

Ásetingar fyri D2 øki eru m.a.:

- *Umráðisparturin verður kannaður ítrótti og øðrum, sum eftir eini heildarætlan fyri alt økið ella ein part av økinum kann virka saman við ítróttinum.*
- *Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í 2007 varð ætlan um at skipa eina serstaka byggisamtykt fyri Stórutjørn. Økið varð lagt av til vinnuøki, bústaðarbygging, ítróttar- og frítíðarvirksemi og almenn fríøki, sí kortskjal *Serstøk byggisamtykt – kort.*

Bygging og skipan eftir serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn varð tó aldrin til veruleika og ongar ætlanir eru at skipa økið eftir serstøku byggisamtyktini, sum eftir hondini er vorðin ótíðarhóskandi. Tí verður arbeitt við uppskoti um at avtaka serstøku byggisamtyktina fyri Stórutjørn, so arbeitt kann verða við víðari menning og býarvøkstri í økinum.

Í 2015 varð samtykt at geva SEV rættin til optión at keypa eitt uml. 20.000-30.000 $m^2$ stórt byggilendi við Stórutjørn, partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík. Hendan optiónin var galdandi í 1 ár, og av tí at Tórshavnar kommuna ikki hevur hoyrt meira frá umsøkjaranum, er avtalan ikki galdandi meir.

Magn stendur á bíðilista hjá kommununi um so er, at kommunan ger eina útstykking til vinnustykkir. Men Magn hevur einans ynski um eitt grundstykki, sum skal liggja við innkomuvegin, og hevur man í síni tíð tikið atlit til hetta ynski í Stórutjørn verkætlanini, har man vildi avseta eitt øki til eina bensinstøð í Hoyvíkshaganum. Har fyriliggur tó ikki ein føst avtala, so um kommunan ikki avsetur eitt øki til bensinstøð í Hoyvíkshaganum, so er einki grundstykki tøkt at tilluta Magn. Somuleiðis er tað ein avbjóðing, at ein einstakur keypari verður valdur at keypa eitt grundstykki við bestu plasering út til møguligan innkomuveg.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Serstøk byggisamtkyt Stóratjørn – broyting av byggisamtykt,* journal nr. 2006-1204.
*Selmar Nielsen: Umsókn vegna SEV um rættin til optión at keypa byggilendi við Stórutjørn partur av matr. nr. 135ed, Hoyvík,* journal nr. 15/02686.
*Avtøka av serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn,* journal nr. 17/03802.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Ongin

**Umhvørvisárin**
Í sambandi við at serstøk byggisamtykt varð gjørd fyri Stórutjørn í 2008, gjørdi Føroya Náttúrugripasavn, eftir áheitan frá Tórshavnar kommunu, árinskanning av bygging í økinum, sí skjal *árinskanning 1-34.pdf*.

Árinskanningin vísti m.a. at:
- 47 plantusløg vóru skrásett í økinum, ongar av hesum plantum vóru sjáldsamar.
- 13 fuglasløg eiga í økinum. Fýra teirra eru á føroyska reyðlistanum og fevnd av Bonn-sáttmálanum (grágás, spógvi, lógv og vípa).
- Talið av sordýrum er skiftandi úr einum stað í annað. Funnu klukkurnar eru millum vanligu klukkurnar í Føroyum.

Í niðurstøðuni av árinskanningini verður mælt til, at lyngurin í økinum verður vardur bæði í sambandi við grøn øki á byggiøkinum og á økinum uttanum. Somuleiðis verður mælt til at geva fuglinum frið til at byggja á økjunum nærindis (t.d. við at virksemi sum spreinging, ið órógvar fuglin, ikki verður framt, tá ið fuglurin reiðrast).

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Stóratjørn,* journal nr. 18/03468-2.
*Stóratjørn – byggisamtykt,* journal nr. 18/03468-2.
*Innkomuvegur,* journal nr. 18/03468-2.
*SEV optión,* journal nr. 18/03468-2.
*Árinskanning 1-34.pdf.* journal nr. 18/03468-4.
*Serstøk byggisamtykt – kort,* journal 18/03468-5.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 200.000 av konto L62032 Gøta kring Havnina og fiskastykki, til at gera avtalu við uttanhýsis ráðgeva um at skipa økið við Stórutjørn og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 03. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 10. oktober 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 200.000 av konto L62032 á konto 7315 kommunuætlanin, og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 25. oktober 2018:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 29. november 2018:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

**Ískoyti:**
Síðani málið varð samtykt á býráðsfundi 29. november 2018, hevur umsitingin arbeitt við at framleiða tilfar, ið skal nýtast í sambandi við at skipan av økinum skal bjóðast út sum almenn hugskotskapping.

Í kappingartilfarinum verður ført fram, at ynski er at skipa økið til blandaða búðstaða- og miðstaðabygging, stórhøll og lætta vinnu. Atlit skulu takast til verandi lendið, flora og fauna og søguna í økinum, sum gamlir torvheiðar.

Lagt verður upp til at bústaðarbyggingin, sum verður í økinum, er blandað, og at dentur verður lagdur á trivnaðin í økinum, bæði tá hugsað verður um støddarlutfallið, og í skipanini av útiøkjunum.

Í sambandi við kommunuætlanina, eru nøkur økir vald út, sum hóska seg til býarvøkstur, harímillum er Stóratjørn eitt av teimum best egnaðu, sí øki 1, skjal *Vakstrarøkir í Hoyvík*. Øki 1, 2 og 3 liggja uppat hvørjum øðrum, og tí eru tey viðgjørd sum eitt øki, tá tað viðvíkur kloakk og vegum.
Økini 1, 2 og 3 kunnu viðgerast undir einum, tá tey liggja upp at hvørjum øðrum. Økini liggja í Hoyvíkshaganum og liggja norðan fyri verandi býlingar og ringveg.

**Viðmerkingar frá teknisku deild:**
Tekniska deild hevði hesar viðmerkingarnar til hesi økini:

Talan er um øki, ið skulu gerast heilt av nýggjum, hvat viðvíkur kloakk og vegagerð.

Ongin kloakk er í økinum sum kann brúkast, og tí er neyðugt at gera eina nýggja kloakkleiðing, sum skal leggjast oman til Hvítanes.

Viðvíkjandi vegíbinding, er økið væl egnað og lætt at fara undir, tá vegurin Klingran gongur tætt framvið og kemur Ytri Ringvegurin eisini at liggja í økinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til
- at økið verður boðið út sum ein arkitektakapping til skipan av økinum.
- At játtaðar verða 600.000 kr. av konto L62032 til kappingarvinnarar og til uttanhýsis ráðgeving í sambandi við kappingina.
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. september 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at boðið verður út millum føroyskar fyritøkur.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 23. oktober 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Í viðgerðini av fyribils kappingarskránni til hugskotskappingina, er umsitingin gjørd varug við, at neyðugt verður við størri játtan enn upprunaliga mett fyri at seta kappingina í verk.

Dómsnevndin dømir um innkomnu uppskotini, og um talan verður um tvær ella tríggjar virðislønir, umframt møguligt keyp av góðum hugskotum. Harafturat skal dómsnevndin lønast og hava ferðaútreiðslur goldnar.

Mett er, at neyðugt verður at játta 1,0 mió. til endamálið.

Tekniski stjóri og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at játta kr. 1.000.000,00 av konto 6275, L00001, Løgukarmur fyri árið, til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275
2. at heimila umsitingini at bjóða ætlanina út í kapping
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. oktober 2019:** Útsett.

**Býráðsfundur 30. oktober 2019:** Tikið av skrá**.**

**Nýtt tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
1. at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum.
2. at játta kr. 1.000.000,00 til nýggja verkætlan "Stóratjørn" undir konto 6275.
3. at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 06. november 2019:** Samtykt at ætlanin verður boðin út til almenna undangóðkenning, soleiðis at kommunan kann velja nakrar ráðgevar til at arbeiða víðari við at gera uppskot til skipan av økinum, og at heita á figgjarnevndina at finna fígging.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini við teirri broyting, at játtanin á kr. 1.000.000 skal játtast av konto 20910 «aðrar útreiðslur» og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 12. desember 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Hugskotskappingin "skipan av Stórutjørn" er liðug.
Innkomnu uppskotini og dómsnevndarúrskurður verður kunngjørdur á fundinum.
Úrslitið verður almannakunngjørt 18.05.2020.

Skjal nr. 18/03468-39, dómsnevndarúrskurður, verður lagt í málið aftaná almennakunngerðingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla byggi- og býarskipanarnevndini til at staðfesta dómsnevndarúrskurðin, og at arbeiða víðari við skipan av Stórutjørn í tráð við ætlanina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 18. mai 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at tilfarið kom á fundinum og at vit ikki hava fingið høvi til at nærlisið tilfarið, áðrenn endalig støða skal takast.

**Býráðsfundur 28. mai 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Vitandi um, at kommunan hevur tørv á størri byggilendi, er tað avgerandi fyri býarmenningina, at planleggingin av kommununi er framtíðartryggjað og í tráð við tær ætlanir og avbjóðingar, sum kommunan stendur upp ímóti.

Í vár varð arkitektakapping skipað um skipan av Stórutjørn, sum sambært Kommunuætlanini er fremst raðfest til býarvakstrarøki í kommununi. Tvær fyritøkur vunnu rættin at verða knýtt at prosjekteringsarbeiðinum sum ráðgevi at gera forprosjekt til fremstu raðfestingina av ætlanini.

Fyri at kunna fara inn á økið við teimum framtíðarætlanum, sum fyriliggja, er tað tí av stórum týdningi at endaliga skipanin av Stórutjørn verður raðfest.

Umsitingin ynskir at fara í samstarv við vinnandi fyritøkurnar fyri at nágreina skipanina av økinum, og gera raðfestingar, soleiðis at farast kann undir partar av útstykkingini.

Stóratjørn er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin verður neyðugt at fara í samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum.
Kappingin fevndi um økið matr. nr. 135ed og matr. nr. 1æf. Víddin á matriklunum er:
- matr. 135ed er 108175 $m^2$ til støddar (kortvídd)
- matr. 1æf er 117.184 $m^2$ til støddar (kortvídd)

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at yvirtaka í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin kann gerast veruleiki í stigum.

Somuleiðis er at upplýsa, at arbeitt verður við avtaluni millum Landsverk og kommununa um innkomuvegin, sum endaliga kemur at hava stóra ávirkan á virkið í Stórutjørn.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at játta 2 mió. kr. av konto 6475, Byggibúning bústaðir, L64011, Útstykking Stórabrekka, á konto 6275, Fríðkan av kommununi (íløgur), L62039, Stóratjørn til framhaldandi skipan av økinum.
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við landið og Búnaðarstovuna um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið sum eykajáttan, ið skal viðgerast tvær ferðir.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg um at broyta játtan 2 mió. kr. til ikki at taka av konto 6475 men av tøkum peningi.

Broytingaruppskotið fall við fimm atkvøðum fyri, átta ímót og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, ongari ímóti og fimm blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen og Ruth Vang.

Uppskotið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 25. mars 2021:** Samtykt við aðru viðgerð við átta atkvøðum fyri, tveimum ímóti og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen og Gunvør Balle.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Ruth Vang.

**Ískoyti:**
Umsitingin hjá Tórshavnar kommunu hevur seinastu tíðina samskift við teir báðar vinnararnar av kappingini um ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn, sí viðhefta uppskot til ráðgevarasáttmála *Stóratjørn__Ráðgevarasátmáli_FYRIBILS_2021.12.07*. Smb. sáttmálanum skulu ráðgevarnir gera eina yvirskipaða heildarætlan fyri økið, ið skal lýsa fortreytirnar fyri bygging, eitt uppbýti av økjum sum tilsamans skapar ein fjøltáttaðan býarpart. Ætlanin skal vísa eina skipan ella staðseting av vegaføring, parkering, bussleið, bústaðar-, stovns-, vinnu- og ítróttarbýlingum.

Harumframt eru frágreiðingar viðv. hugsjón og virðum, fortreytum, burðardygd, økisbýti, náttúru, tilhaldi, býlingum, vegakervi, gøtukervi, høvuðsleiðingum, endurnýtslu og byggibúning.

Sambært tíðarætlanini tekur arbeiðið at gera heildarætlanina tríggjar mánaðir og ráðgevingin kostar 2.000.000,- kr. u.mvg.

Á býráðsfundinum 25. mars 2021 varð samtykt at játta 2.000.000,- kr. til framhaldandi skipanina av økinum. Av hesum eru 1.970.000,- kr. eftir. Soleiðis íresta 530.000,- kr. til ráðgevarnar, umframt 100.000,- kr. til aðrar útreiðslur í smb. við gerð av heildarætlanini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At taka undir við uppskotinum til ráðgevarasáttmála í.s.v. gerð av heildarætlan fyri Stórutjørn.
- At játta 630.000,- kr. av konto 6275, LK62999, Fríðkan av býnum (løgukarmur fyri árið 2022), á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn, til samsýning til ráðgevarnar.
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. januar 2022:** Samtykt at játta kr 330.000 av kt. 6275, LK62999, Fríðkan av býnum, á konto 6275, Fríðkan av býnum, L62039, Stóratjørn. Nevndin ynskir, at hædd verður tikin til veðurviðuskiftini og handilsviðurskiftini í tilgongdini, umframt at nevndin ynskir at verða kunnað leypandi.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini við tí broytingaruppskoti frá Elsu Berg, at náttúruviðurskifti verður lagt afturat orðingini hjá Byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð einmælt samtykt**.**

**Ískoyti:**
25. mars 2021 samtykti býráðið at heimila umsitingini at fara í samráðingar við Búnaðarstovuna um keyp av lendinum til menning av Stórutjørn-verkætlanini.

Seinasta árið hevur verið arbeitt við innkomuvegnum, og er arbeiðið við vegnum nú komið so væl áleiðis, at arbeiðsvegurin eftir ætlan verður boðin út fyrsta dagin.

Í samb. við at menna økið, verður mett, at tað er av stórum týdningi, at lendið, sum liggur eystan fyri innkomuvegin, verður lagt afturat Stjórutjørn verkætlanini, soleiðis at alt økið kann síggjast sum ein heild í samb. við skipan av økinum.

Stóratjørn og lendið norð til innkomuvegin er ogn hjá landinum, og fyri at kommunan kann fara undir at vaksa um býin, verður neyðugt at fara í samráðingar við festaran og Búnaðarstovuna um keypið av lendinum. Sigast skal, at bæði festarin og Búnaðarstovan er kunnaði um ætlanirnar.

Talan er sostatt um eitt stórt øki, sum ætlanin er at menna til framtíðar bý. Heilt ítøkiliga er støddin um 960.000 fermetrar, og av tí at lendið er so stórt, og býarmenningin ikki kemur at verða framd í einum, so er ætlanin at gera eina avtalu við Búnaðarstovuna um at yvirtaka lendið í stigum, soleiðis at Stóratjørn verkætlanin og ein møgulig vinnuútstykking kann gerast veruleiki, uttan at tørvur er á at ogna sær alt økið í einum.

Sí skjal, "Arealnýtsla", sum sýnir økið, sum ætlanin er at gera eina avtalu við landið, Búnaðarstovuna og festaran um.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Stjórnardeildini, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til:

- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og gera avtalu við landið, Búnaðarstovuna og festaran um keyp av lendinum í stigum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Samlaða lendisvíddin, ið skal nýtast til innkomuvegin, vinnuútstykking og framtíðar sethúsa- og aðrar útstykkingar í Hoyvíkshaganum er umleið 1 mió. fermetrar. Talan er um partar av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a allir í Hoyvík. Partur av hesum lendi liggur í Hoyvíkshaganum norðara parti (matr. nr. 139a og matr. nr. 1æf), og situr festari við hesum festinum, meðan partur av lendinum er partur av Hoyvíkshaganum sunnara parti (matr. nr. 139ed og 135a), sum eingin festari situr við, men sum festarin í Hoyvíkshaganum norðara parti brúkar sum bit v.m.
Til innkomuvegin og framtíðar vinnuútstykking er neyðugt at ogna sær uml. 341.000 fermetrar burtur av matr. nr. 135ed, 1æf og 139a. Sí kortskjal "*Keyp av lendi Hoyvíkshagin_Norðari partur*". Samstundis skal avtala gerast við Búnaðarstovuna og festaran, sum tryggjar Hoyvíksgarðinum nøktandi viðurskifti og víðkanarmøguleikar í framtíðini, og hetta ber millum annað í sær, at byggisamtyktin skal endurskoðast og broytast, so eingin býarvøkstur fer fram uttanfyri komandi innkomuvegin. Innkomuvegurin verður sostatt mark millum býin og landbúnaðarvirksemið í Hoyvíkshaganum. Miðjað verður ímóti at gera avtalu við festaran um at leggja avlopstilfar inn á økið, ið festarin situr við, so hetta kann bøta um møguleikarnar fyri landbúnaðarviksemi á festinum.

Kostnaðurin fyri lendi í Hoyvíkshaganum er 89 kr./m², og afturat hesum skal rindast fyri avloysing av biti (70 oyru/m²), frábýtingarútreiðslur, tinglýsingarkostnaður og sakargjald til Búnaðarstovuna. Saman við

útreiðslunum til skipan og projektering av vinnuútstykkingini í økinum og atknýttum vegum, er samlaði fíggjartørvurin mettur til umleið 34 mió. kr.

Viðv. útstykkingum burtur av matr. nr. 139ed og matr. nr. 1æf (írestandi partinum av hesum matr.) er ætlanin at keypa lendi frá Búnaðarstovuni í stigum og rinda so hvørt, sum tørvur verður á lendi at útstykkja. Ilt er at siga í løtuni, hvussu stórari vídd, tørvur verður á, tí økið er ikki endaliga skipað enn. Ætlanin er tískil í fyrsta umfari at fáa heimild til at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi burtur av matr. nr. 1æf og allan matr. nr. 139ed til framtíðar býarmenning, og at rindað verður fyri lendið so hvørt, sum tørvur er á tí í mun til býarvøksturin.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til

- at játta kr. 34.023.170,00 til keyp av lendi og aðrar útreiðslur í hesum sambandi til innkomuvegin og framtíðar útstykkingar á matr. nr. 135ed, 1æf og 139a, Hoyvík. Peningurin verður játtaður av játtanini til innkomuvegin við 7.880.792,50 kr. av konto 8175 Vegir (løgur), L L81037, Innkomuvegur, og 26.142.377,50 kr. av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldin Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum í útstykkingini.
- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina sum eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:** Í mun til ískoytið til fíggjarnevndarfundin 16. mars 2022 eru smærri tillagingar gjørdar í lendisnýtsluni v.m. í sambandi við, at málið verður lagt fyri aftur fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

Samlaða lendisvíddin, ið skal nýtast til innkomuvegin, vinnuútstykking og framtíðar sethúsa- og aðrar útstykkingar í Hoyvíkshaganum er umleið 1 mió. fermetrar. Talan er um partar av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a allir í Hoyvík. Partur av hesum lendi liggur í Hoyvíkshaganum norðara parti (matr. nr. 139a og matr. nr. 1æf), og situr festari við hesum festinum, meðan partur av lendinum er partur av Hoyvíkshaganum sunnara parti (matr. nr. 139ed og 135a), sum eingin festari situr við, men sum festarin í Hoyvíkshaganum norðara parti brúkar sum bit v.m.

Til innkomuvegin, íbindingarvegir og framtíðar vinnuútstykking skal kommunan ogna sær uml. 319.000 fermetrar burtur av matr. nr. 135ed, 1æf, 139a og 135a, Hoyvík. Sí kortskjal "*Keyp av lendi Hoyvíkshagin_Norðari partur - greinað*".

Samstundis skal avtala gerast við Búnaðarstovuna og festaran, sum tryggjar festaranum á Vatnaskørðum nøktandi viðurskifti og víðkanarmøguleikar í framtíðini, og hetta ber millum annað í sær, at byggisamtyktin skal endurskoðast og broytast, so eingin býarvøkstur fer fram uttanfyri komandi innkomuvegin. Innkomuvegurin verður sostatt mark millum býin og landbúnaðarvirksemið í Hoyvíkshaganum. Miðjað verður ímóti at gera avtalu við festaran um at leggja avlopstilfar inn á økið, ið festarin situr við, so hetta kann bøta um møguleikarnar fyri landbúnaðarviksemi á festinum.

Kostnaðurin fyri lendi í Hoyvíkshaganum er 89 kr./m², og afturat hesum skal rindast fyri avloysing av biti (70 oyru/m²), frábýtingarútreiðslur, tinglýsingarkostnaður og sakargjald til Búnaðarstovuna. Saman við útreiðslunum til skipan og projektering av vinnuútstykkingini í økinum og atknýttum vegum, er samlaði fíggjartørvurin mettur til umleið 32 mió. kr.

Viðv. útstykkingum burtur av matr. nr. 139ed og matr. nr. 1æf (írestandi partinum av hesum matr.) er ætlanin at keypa lendi frá Búnaðarstovuni í stigum og rinda so hvørt, sum tørvur verður á lendi at útstykkja. Ilt er at siga í løtuni, hvussu stórari vídd, tørvur verður á, tí økið er ikki endaliga skipað enn. Ætlanin er tískil í fyrsta umfari at fáa heimild til at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi burtur av matr. nr. 1æf og allan matr. nr. 139ed til framtíðar býarmenning, og at rindað verður fyri lendið so hvørt, sum tørvur er á tí í mun til býarvøksturin.

**Tilmæli**:
Kommunustjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at játta kr. 31.987.030,00 til keyp av lendi og aðrar útreiðslur í hesum sambandi til innkomuvegin, íbindingarvegir og framtíðar útstykkingar á matr. nr. 135ed, 1æf, 139a, og 135a Hoyvík.

Mælt verður til at játta peningin soleiðis:

- Kr. 4.600.000,00 av konto 8175 Vegir (løgur), LK81037, Innkomuvegur

- Kr. 1.297.406,00 av konto 8175 Vegir (løgur), L81037, Innkomuvegur

- Kr. 26.089.624,00 kr. av konto 6975, Byggibúning ídnaðarøki, ið verður afturgoldin Tórshavnar kommunu í sambandi við sølu av vinnustykkjum í útstykkingini.

Harumframt mælt til:

- at heimila umsitingini at gera avtalu við Búnaðarstovuna um at keypa lendi í stigum til framtíðar útstykkingar burtur av matr. nr. 1æf og 139ed. So hvørt, sum tørvur er á fígging, verður málið lagt fyri aftur avvarðandi nevndir til støðutakan.
- at heimila umsitingini at samráðast við og gera avtalu við festaran um avlopstilfar og um at framtíðartryggja møguleikarnar at reka landbúnaðarvirksemi á festinum. Avtalan verður at liggja fyri aftur og góðkenna av avvarðandi nevndum.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Viðvíkjandi játtanini á kr. 26.089.624,00 er talan um eykajáttan, ið krevur tvær viðgerðir í býráðnum.

**Fíggjarnevndin 23. mars 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022: Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá** Heðini Mortensen, borgarstjóri, ið er soljóðandi:

Mælt verður til at taka undir við uppskotinum við broyting í fíggingini. 4,6 mió. kr. verða ikki fíggjaðar av løgukonto innkomuvegur; men verður fíggjað av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka.

Broytingaruppskotið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup DAM, Gunvør Balle, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Jan Christiansen.

Uppskotið soleiðis samtykt við aðru viðgerð.

# 90/22 Umsókn um at broyta byggisamtyktina fyri matriklar 1300a, 1300b og 1301a, Hoyvíksvegur 45, 47 og 49, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 26/22 | 21/04706-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2022 | 71/22 | 21/04706-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 91/22 | 21/04706-2 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 90/22 | 21/04706-2 |

**Upprunin til málið**
Eigararnir av matr. nr. 1300a, 1300b og 1301a við Hoyvíksvegin í Tórshavn søkja um at ognirnar verða tiknar úr serstøku byggisamtykt nr. 3, sum m.a. er galdandi fyri Konmansmýru og ítróttarøkið í Gundadali, soleiðis at ognirnar verða fevndar av ásetingunum fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sí skjal *Umsókn um at broyta byggisamtykt Hoyvíksvegur*.

Í umsóknini undrast eigararnir á, at matriklarnir eru fevndir av serstøku byggisamtyktini fyri Konmansmýru, av tí at matriklarnir ikki eru partur av útstykkingini sum varð gjørd, og sum fevnir um Vípuveg, Spógvaveg og Mýrisnípuveg. Atkoma til allar matriklarnar er frá Hoyvíksvegnum, og skrivað verður, at einki samband er millum stykkini og útstykkingina við Spógvavegin.

**Lýsing av málinum**
Matriklarnir, 1300a, 1300b og 1301a liggja við vegamótið Tjaldursvegur/Hoyvíksvegur, og liggja soleiðis á markinum millum vinnuøkið á Hálsi/Óðinshædd og bústaðarøkið á Konmansmýru. Býarskipanarliga verður tað mett, at matriklarnir 1300a, 1300b og 1301a við Hoyvíksvegin, heilt natúrliga hoyra sethúsaøkinum á Konmansmýru til, sí skjal *Matriklar og byggisamtykt*.

Serstaka byggisamtykt nr. 3 varð gjørd í 1972 sum ein av teimum fyrstu serstøku byggisamtyktunum, í eini røð av serstøkum byggisamtyktum, ið skuldi skipa nýggj øki, og annars øki, ið vóru mett at hava ein serligan dám. Øll sethúsabygging á Konmansmýru og í Eysturbýnum sum heild, verður skipað í serstøkum byggisamtyktum (Serstøku byggisamtyktunum nr. 3 og nr. 7). Um broytingin, ið søkt verður um, verður játtað, eru hesir tríggir matriklarnir soleiðis teir einastu í hesum stóra býarparti, ið ikki eru skipaðir í serstakari byggisamtykt.

Í mun til ásetingarnar fyri A1 sethúsaøki í almennu byggisamtyktini, so hevur A sethúsaøki í serstøku byggisamtyktini nr. 3 eitt sindur fleiri ásetingar og bindingar. T.d. kann støddin á húsunum ikki verða størri enn eitt vist og eitt ávíst takhall og litur á tekju er ásett. Hesar ásetingar eru partur av orsøkini til, at sethúsaútstykkingin á Konmansmýru verður mett at hava eitt stórt býarskipanarligt virði.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingarnar fyri A:sethúsaøki í serstøku byggisamtykt nr. 3 eru m.a. hesar:

- Við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, skal eindin ikki verða nýtt uttan til sethús, og bygd mugu vera einans stakhús, ið standa fyri seg.
  Á eindini kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi, ristingum ella við útsjónd síni ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
- Sethúsavíddin kann á ongari grund vera størri enn 150 m$^2$ hesum undantikin er tó parturin, sum er strikumerktur á kortinum og kannaður stovnabyggingum, har ið bygda víddin kann ikki vera størri enn 500 m$^2$.
- Hús skulu ikki hava meiri enn eina hædd – møguligan kjallara.

- Reisingin skal vera 25° reyst. Húsini skulu hava vanliga reising við skjøldrum. Mønan og framsíðan skulu vera javnfjarar.

Ásetingarnar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a. hesar:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
- Byggistigið má ikki fara upp um 0,3.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Umsókn um at broyta byggisamtykt Hoyvíksvegur,* journal nr. 21/04706-1.
- *Matriklar og byggisamtykt,* journal nr. 21/04706-3.
- *Serstaka byggisamtykt nr. 3,* journal nr. 21/04706-4.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at umsóknin um at matriklarnir 1300a, 1300b og 1301a, Tórshavn verða tiknir úr serstøku byggisamtykt nr. 3, ikki verður gingin á møti grundað á:
- At matriklarnir natúrliga hoyra sethúsaøkinum á Konmansmýru til.
- At ynskið er, at varðveita dámin á sethúsaøkinum á Konmansmýru.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2022:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin var á fundi við eigarar av ognunum 1300a, 1300b og 1301a, Tórshavn hin 23.03.22, sí skjal *Fundarfrágreiðing – fundur við umsøkjarar*. Á fundinum greiddi umsitingin frá sínum sjónarmiðum viðv. skipanini av økinum og eysturbýnum sum heild, og ynskinum at varðveita dámin í økinum. Umsøkjarar greiddu somuleiðis frá sínum sjónarmiðum, at teir mettu, at serstaka byggisamtyktin var avmarkandi fyri møguleikarnar í økinum, og at teir ikki mettu, at teirra ognir vóru natúrligur partur av útstykkingini við Konmansmýru og tískil heldur ikki nýttist at hava sama dám.

**Tilmæli:**
Víst verður til tilmælið til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini 07.02.2022.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at ganga umsóknini á møti.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

# 91/22 Nýggj serstøk byggisamtykt við Miðhorn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 99/22 | 22/00644-2 |
| 2 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 91/22 | 22/00644-2 |

**Upprunin til málið**
Á vetri 2020/2021 varð økið við Miðhorn boðið út til bygging av bústøðum. Avtala varð gjørd við byggifelag, almenna byggisamtyktin fyri økið broytt, og nú er verkætlanin komin so væl ávegis, at klárt er at gera serstaka byggisamtykt, ið skipar økið neyvari.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjari hevur sent inn skipanaruppskot, sí skjal *Miðhorn skipanaruppskot A3 mappa februar 2022_minkað.pdf,* ið vísir hvussu økið er ætlað skipað við raðhúsum, íbúðarbygningum, felagshús, bilskýlum, skúrum o.ø. Dentur er lagdur á at laga byggingina til lendið og útiumhvørvið, og ferðsla er skipað við atliti til spælandi børn og fólk til gongu.

Skipanaruppskotið fatar um:
- 21 raðhús við tilhoyrandi bilskýli, skúri og hjalli.
- Íbúðarhús við 36 íbúðum, goymslum, tøkni v.m.
- 2 íbúðarlonir við 28 íbúðum tilsamans (stendur 22 í skipanaruppskotinum, men hetta er eftirfylgjandi broytt til 28).
- Felagshús.
- Felags verkstaður.
- Torg, spæliøki og uttandura uppihaldsøki.

Í mun til útbjóðingarskrivið, so er økið skipað á ein eitt sindur annarleiðis hátt, fyrst og fremst grundað á avbjóðingar við at leggja veg inn á økið, men mett verður, at skipanaruppskotið skipar økið á ein skynsaman hátt, og er í trá við endamálið fyri útbjóðingini av økinum til bústaðabygging.

Nýggja bústaðarøkið við Miðhorn liggur í A1 og A2 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Byggingin í økjunum A1, A2, A1, A4, B1, B2 og C, sí skjal *Støðumynd,* er í trá við ásetingarnar fyri økini. Byggingin G og H eru íbúðarbygningar, men liggja í A1 øki, ið annars er lagt til stakhús/tvíhús/raðhús. Hendan byggingin er somuleiðis hægri enn mest loyvda hædd sambært almennu byggisamtyktini. Í serstakari byggisamtykt ber til at víkja frá ásetingunum um nýtsluna (íbúðarbygging) og hæddina og mett verður at hetta er ráðiligt, grundað á samlaðu skipanina og lendisviðurskiftini í økinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a. hesar:
- Loyvt er einans at byggja stakhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð, og eftir serloyvi frá byggivaldinum tvíhús, sum eisini kunnu hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð og raðhús og tílíkar bústaðir fyri eitt húski.
  Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
- Hús við vanligari mønureising mugu einans verða bygd í tveimum hæddum umframt nýttum lofti og mugu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.
- Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum takið kann tann lægra síðan í mesta lagi verða 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan í mesta lagi verða 7,5 m.
- Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrligt avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

Í serstakari byggisamtykt kann víkjast frá ásetingum um tal av hæddum og hæddarásetingum, har lendið er soleiðis háttað, at tað fellur natúrliga inn.

Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a. hesar:
- Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tann parturin av Velbastaðvegnum, sum útstykkingin skal bindast í, er framvegis landsvegur, men hevur Tórshavnar kommuna søkt um at yvirtaka vegin – samráðingar hesum viðvíkjandi eru í gongd. Um vegurin ikki er yvirtikin áðrenn byrja verður at stykkja út, skal íbinding góðkennast av Landsverk."

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Útbjóðing av útstykking við Miðhorn í Tórshavn,* journal nr. 20/03654.
- *Broyting av almennu byggisamtyktini við Miðhorn, matr. nr. 1160a, Tórshavn,* journal nr. 21/01539.
- *Umsókn um góðkenning av heildarætlan og fyribils byggiloyvi matr. nr. 1160a, Miðhorn, Tórshavn,* journal nr. 22/00438.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Serstøk byggisamtykt fyri Miðhorn*, journal nr. 22/00644-7.
- *Miðhorn skipanaruppskot A3 mappa februar 2022_minkað.pdf,* journal nr. 22/00644-4.
- *Støðumynd.pdf,* journal nr. 22/00644-1.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | x | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | x | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt við Miðhorn, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Tikið av skrá.

# 92/22 Menning av Vágsbotni – Ætlan fyri Summarið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 95/22 | 22/01036-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 32/22 | 22/01036-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 98/22 | 22/01036-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 92/22 | 22/01036-1 |

**Upprunin til málið**
8. mars 2021 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í málinum Vágsbotnur – skipan av økinum (j.nr. 18/00808) at heimila umsitingini at skipa Vágsbotntorgið yvir summarið við at innlima ymisku áhugapartarnar, soleiðis at fyribils verkætlanin kann virka undir eini endaligari skipan av økinum.

**Lýsing av málinum**
Í Miðbýarætlanini frá 2016 *(*Miðbýarætlan_juni 2016*, J.Nr. 22/01036-11)* varð ein ætlan løgd fyri hvussu arbeiðast kann skynsamt við menningini av ymsum økjum í býnum.
"Fyribils átøk sum amboð" var til dømis ein menningarháttur, har býarskipanarlig menningarstig eitt nú kundu setast upp sum royndarverkætlanir til tess síggja hvussu ymisk átøk kundu roynast sum ein varandi loysn fyri útvald øki í býnum. Eitt av hesum økjunum var býarrúmið í Vágsbotni, ið sambært ætlanini skal mennast sum partur av mentanargøtuni í Tórsgøtu og sum eitt miðsavnandi miðbýartorg.

Í 2020 varð arkitektakapping útskrivað at skipa miðbýartorgið í Vágsbotni. Zeta Arkitektar áttu vinnandi hugskotið, men grundað á serligur viðurskiftini í økinum, og tí at endaliga nýtslan av økinum ikki hevur verið roynd áður, so var avgerð tikin um at royna aðrar menningarmøguleikar í økinum fyrst, soleiðis at ein fyribils verkætlan kann liggja til grund fyri eini endaligari skipan av økinum.

Í hesum sambandi er ein arbeiðsbólk settur at arbeiða við eini fyribils royndarætlan av torginum í summar. Arbeiðsbólkurin er mannaður av:

- Biritu Wardum, býararkitekti í Tórshavnar kommunu.
- Liljuni Weihe, stjóra í Visit Tórshavn.
- Boga Andreasen, rakstrarleiðara í mentanarhølunum í Tórsgøtu
- Høgna L*ü*tzen, stjóra í byggibúðini, Valdemar L*ü*tzen, sum umboði fyri vinnurekandi í nærumhvørvinum.

Jóannesi B. Lamhauge, arkitektur á Býarskipanardeildini virkar sum verkætlanar samskipari av royndarætlanini.

Arbeiðsbólkurin skal saman taka støðu til, hvussu Vágsbotnur kann endurskipast sum býarrúm í eini fyribils verkætlan fyri summarið 2022, har ymisk menningarátøk verða roynd í verki.

Verkætlanin snýr seg um at gera eina býarskipanarliga royndarverkætlan í Vágsbotni fyri summarið 2022, sum kann gerast ein leistur fyri hvussu økið kann mennast í framtíðini til eina varandi loysn. Sí viðheft skipanaruppskot og íløguætlan: Vágsbotnur_skipanaruppskot_íløguætlan 2022, j. nr. 22/01036-20, sum lýsir nakrar tankar fyri økið, men, sum tó ikki er bindandi fyri hvat fer at verða gjørt.

Umhvørvið í Vágsbotni spælir ein týdningarmiklan leiklut í mun til hvussu miðbýurin í Havn kennist á summarhálvuni. Mongu seinastu árini hevur økið undir Bryggjubakka verið karmur um eitt vaksandi

virksemi hvat trivnaði og frítíðartilboðum í miðbýnum viðvíkur. Fólk leita sær oman her í góðveðri, tí her ber til at njóta sólargóðu uppihaldsumstøðurnar í einum lutfalsliga bilfríum maritimum umhvørvi.

Í verkætlanini verða karmarnir í Vágsbotni og undir bryggjubakka mentir, so at teir í størri mun kunnu hýsa uppihaldi, trivnaði, frítíðarlívi, útimarknaði og áhaldandi tiltøkum í summarmánaðunum frá mai til september 2022.
Í verandi løtu ber økið í Vágsbotni brá av at vera óskipað, og er í dagliga brúkinum darvað av fløktum ferðsluviðurskiftum í bili og til gongu. Somuleiðis er lendið ójavnt, og samansett við ymsari álegging, ið bæði misprýðir um økið, og sum í støðum ger tað torført og vandamikið at ganga hjá summum.
Harafturat er økið í verandi løtu innrættað so, at bilferðslan er løgd ígjøgnum partin av Vágsbotntorginum við besta sólargangi, ímeðan økið har borðbeinkir eru uppsettir aloftast liggur í skugga og kennist kalt. Við atliti til at økið eigur at raðfestast sum eitt uppihaldstorg, metir arbeiðsbólkurin, at hendan skipanin av økinum eigur at verða umskipað, soleiðis at funktiónirnar verða staðsettar øvut.

Avbjóðingarnar í sambandi við at menna økið sum heild hava verið, at ferðsluviðurskiftini í økinum ikki hava verið loyst á ein nøktandi hátt. Og í sambandi við fyrrverandi ætlanir, sum eru gjørdar fyri økið, hava vinnurekandi áhugabólkar í nærumhvørvinum lagt dent á, at ferðslan í økinum ikki má tarnast hóast økið verður ment. Arbeiðsbólkurin er samdur í, at ferðslan eigur at gerast einvegis út á Skálatrøð frá Tórsgøtu, meðan Mylnugøtu verður framhaldandi við ferðslu báðar vegir.

Av tí at økið harðliga treingir til nýskipan og umvæling, er tað tí hugsandi, at ymisk ætlað fyribilsinntriv, sum arbeiðsbólkurin metir vera neyðug, kunnu gerast uttan at bera ótta fyri at ein ger seg inn á økið.

Sum ein royndarverkætlan fyri summarið 2022 verður tí skotið upp at arbeitt verður við bæði:

- Eini nýggjari skipan av økinum við eini umlagdari vegføring og við einum nýggjum marknaðartorgi við býarrúmsinnbúgvi og einum palli til stórskerm, tónleik og onnur tiltøk.

- Og eini tiltaksætlan, har minst ein samskipari verður settur at skipa fyri áhaldandi tiltøkum og trivnaðartilboðum ígjøgnum summarið.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd fyri verkætlanina, sí skjal Vágsbotnur_skipanaruppskot_íløguætlan 2022, j. nr. 22/01036-20, har samlaði kostnaður fyri royndarverkætlanina áljóðandi 2,7 mió. kr. er útgreinað, her íroknað samskipan av teimum átøkunum, sum skulu liggja til grund fyri at skapa lív í økinum yvir summarið.
Í sambandi við fígging av verkætlanini, so eru kr. 1,5 mió. játtaðar til endamálið á L62034, Vágsbotnur – skipan av økinum. Írestandi fígging áljóðandi kr. 1,2 mió. skal sostatt raðfestast afturat, fyri at verkætlanin kann gerast veruleiki.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Vanliga ferðslulógin fyri koyring í miðbýarumhvørvi er galdandi.

Viðmælt verður tó, at skeltast má, so at hámarksferðin ígjøgnum økið verður tálmað til í mesta lagi 15 km/t.

Sambært verkætlanini skal vegurin út á Skálatrøð einsrættast ígjøgnum Vágsbotn so at bert er koyrandi út.

Ongar ásetingar verða fyri koyring út eftir Bryggjubakka, men her kann skeltast, so at vegurin bert skal nýtast til ørindakoyring.

**Upplýsingar frá umsitingini**

Her verður gjørt vart við, at umtalaða økið í Vágsbotni í verandi løtu er eitt ógvuliga ferðslutungt øki við nærum 5000 gjøgnumkoyrandi bilum dagliga. Sí skjalið: Ferðsluteljingar í Vágsbotni, *j. nr. 22/01036-21 og* Staðseting av ferðslumátara, *j. nr. 22/01036-18.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

Miðbýarætlan – Heildarætlan fyri Miðbýin (j. nr. 16/00491)
Umsókn um byggiloyvi til breiðkan av bryggjuni í Vágsbotni (j. nr. 21/01351)
Kunning til grannar um royndarverkætlanina Skoytubreyt í Vágsbotni (j. nr. 20/04338)
Vágsbotnur – Skipan av økinum (j.nr. 18/00808)

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ferðslunevndin ger vart við, at eitt broytt ferðslumynstur í økinum verður gjørt í samráð við ferðslunevndina.

**Skjøl**
Miðbýarætlan_juni 2016*, J.Nr. 22/01036-11*
Vágsbotnur_skipanaruppskot_íløguætlan 2022, *j. nr. 22/01036-20*
Ferðsluteljingar í Vágsbotni, *j. nr. 22/01036-21*
Staðseting av ferðslumátara, *j. nr. 22/01036-18.*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | x | x |
| **Sosialar avleiðingar** | | x | x | x |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við verkætlanini og at játta kr. 200.000 av LK62034 Vágsbotnur – skipan av økinum fyri árið 2021 og kr. 1 mió. av LK62019, Lendisgøtur til at fremja verkætlanina Menning av Vágsbotni – ætlan fyri summarið 2022 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at kr. 1 mió. verður tikin av LK62996 Miðbýarætlan.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at verkætlanin eisini skal umfata gongubreytir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskot frá Elsu Berg, ið er soljóðandi:

Mælt verður til, at verkætlanin eisini umfatar súkklubreyt.

Broytingaruppskotið fall við átta atkøðum ímóti og fimm atkvøðum fyri.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena Dam á Neystabø, Bjørg Dam og Jan Christiansen.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 431<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 93/22 Strikan av servitutti á matr.nr. 1401a, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 89/22 | 22/00878-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 103/22 | 22/00878-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 93/22 | 22/00878-1 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við íbúðarbygging við Sundsvegin er tørvur á, at strika ein servitutt á ognini, har Tórshavnar kommuna hevur átalurætt.

**Lýsing av málinum**
Tørvur er á, at fáa strika servitutt nr. 1348, sum er lýstur á táverandi matr.nr. 1401, Tórshavn, í 1978. Hesin matrikulin er sundurbýttur síðani og servitutturin liggur nú matr.nr. 1401a v.m., ið skulu nýtast til íbúðarbygging við Sundsvegin.

Servitutturin, ið ynskist strikaður, setur treytir um íbinding og viðlíkahald av kloakkleiðingum, og útstykkjan av einum grundstykki. Víst verður til skjal »*J.nr. 22/00878-2 Servituttur 1348.*«

Tórshavnar kommuna hevur áttalurætt á servituttinum og tí verður heit á kommununa um at strika servituttin.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Strikan av tinglýstum rætti fylgir Løgingslóg um tinglýsing nr. 55 frá 16. august í 1962

§ 11. Til strikingar ella broytingar av rættindum í tænandi eigindómi krevst bert samtykki frá eigaranum av tí valdandi eigindóminum, uttan so aðrir, sum rættindi hava í honum, hava latið serstaka váttan tinglýsa á tí tænandi eigindóminum um, at samtykki teirra krevst til strikingina ella broytingina.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
20/00729 Umsókn um prinsipielt byggiloyvi til íbúðar verkætlan á matr.nr.1401a, við Sundsvegin.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/00878-3 Servituttur frá 19078

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla til at strika servitutt nr. 1348 lýstur í 1978, har Tórshavnar kommuna hevur átalurætt og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

# 94/22 Umsókn um yvirtøku av vegi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 30/22 | 21/05182-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 101/22 | 21/05182-2 |
| 3 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 94/22 | 21/05182-2 |

**Upprunin til málið**
Eigararnir av vegnum matr. nr. 886b, Tórshavn, ynskja, at kommunan yvirtekur privata vegastrekkið av Grønlandsvegi, stødd 311 m².

**Lýsing av málinum**
Grønlandsvegur er partvís kommunalur- og privatur vegur. Talan er um ein eldri veg, sum er í miðal standi.

Vegurin er ein partur av vegakervinum hjá Tórshavnar kommunu og virkar sum ein býlingsvegur í Tórshavnar kommuna.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Til dags dato hevur kommunan varða av vegnum.
Umsitingin metur, at vegurin er í miðal standi, og kommunan hevur gjørt smávegis avvatningar uppgávur á honum.

Vegurin stendur i yvirlitinum hjá kommununi til at verða í miðal standi og hevur ikki tørv á átrokandi ábøtur.

Kommunan varðar av gøtuljósunum, so har verður ongin broyting.

Umsitingin mælir til at yvirtaka privata partin av vegnum, og leggja 311 m² av matr. nr. 886b, Tórshavn, saman við vegnum litra cy, Tórshavn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort - Grønlandsvegur j.nr. 21/05182-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Fíggjarligu útreiðslurnar í sambandi við marknaumskipanina av vegnum á matr. nr. 886b, Tórshavn, eru áleið 5.000 til 10.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin á matr. nr. 886b, Tórshavn, og at kostnaður í sambandi við marknaumskipan verður fíggjaður av konto 8110 Vegir, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

# 95/22 Umsókn um yvirtøku av vegi matr. nr. 1097o, Lambagerði, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 31/22 | 22/00309-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 100/22 | 22/00309-7 |
| 3 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 95/22 | 22/00309-7 |

**Upprunin til málið**
Eigarin av vegnum matr. nr. 1097o, Tórshavn, ynskir, at kommunan yvirtekur Lambagerði, stødd 1752 m²

**Lýsing av málinum**
Lambagerði er ein privatur vegur. Talan er um ein gamlan veg, eldri enn 40 ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Fólk frá umsitingini hava verið á staðnum og hugt at vegnum. Niðurstøðan er, at vegurin er í brúkbarum standi.

Umsitingin mælir til at yvirtaka privata vegin og at leggja matr. nr. 1097o, Tórshavn saman við vegnum litra fy, Tórshavn.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort j.nr. 22/00309-8

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**
Fíggjarligu útreiðslurnar hjá kommununi í sambandi við marknaumskipanina av matr. nr. 1097o, Tórshavn, eru áleið 5.000 til 10.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at kommunan yvirtekur vegin matr. nr. 1097o, Tórshavn, og ber kostnaður í sambandi við marknaumskipan, sum verður fíggjaður av konto 8110 Vegir, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 437 | |
| | Formansins merki: | |

# 96/22 Ferðslutrygd við Eysturskúlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 10.05.2021 | 28/21 | 20/04029-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.09.2021 | 51/21 | 20/04029-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 222/21 | 20/04029-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 229/21 | 20/04029-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 38/22 | 20/04029-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 121/22 | 20/04029-1 |
| 7 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 96/22 | 20/04029-1 |

**Upprunin til málið**
Foreldur at næmingum á Eysturskúlanum eru ótrygg við ferðslutrygdina á staðnum.

**Lýsing av málinum**
Foreldur og foreldraráð á Eysturskúlanum hava heitt á kommununa um at finna eina haldgóða loysn, so ferðslutrygdin kann verða so góð sum til ber.

Umsitingin hevur gjørt eitt ávegis uppskot, 20/04029-2, til hvussu ferðsluviðurskiftini kunnu gerast betri.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | x | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við uppskotinum 20/04029-2.

**Tekniska nevnd 10. mai 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyt:**
Umsitingin hevur gjørt eitt endaligt uppskot, 20/04029-4, og gjørt eina kostnaðarmeting av at ferðslutryggja vegirnar við Eysturskúlan.
Uppskotið fevnir eisini um at fáa til vegar 29 p-pláss til Eysturvøll. Hetta tí íbúgvarar í grannalagnum kæra sína neyð um parkerings óskil við vøllin.

T.v.s. at arbeiðið er klárt at bjóða út sum undirhondsboð til tveir arbeiðstakarar.

Fíggjartørvurin er mettir til 1,8 mill. kr. og kann fíggjast av íløgukonto 8175.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 1.800.000 kr. av konto 8175, LK81043 (Parkeringstunnil), á nýggja verkætlan «Ferðslutrygd við Eysturskúlan» undir konto 8175
  Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Tó skal vegateinurin fram við eysturvølli og parkeringsøkið vestan fyri eysturvøll ikki gerast og um peningur er eftir, skal restin brúkast til skúlagarðin við Eysturskúlan.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið hevur verið í útboði, og lægsta boð átti Maskingrevstur v/Allan og var 2.306.764 kr. v. 6.25% mvg.
Aftrat hesum kemur ferðslutrygdarátøk á 260.000 kr.
Óvæntað roknast til 10% svarandi til 250.000 kr.
Fíggjartørvurin er íalt 2.816.764 kr. v. 6.25% mvg.
Áður játtað 1.300.000 kr., írestandi tørvur er 1.517.000 kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

- Tikið verður undir við, at nevnda verkætlan kann byrja.
- At flyta kr. 900.000 av 8175, LK81999, Vegaverkætlanir, og 617.000 kr. av 6875, LK68999, Kloakkir
- Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

# 97/22 Vinnuútstykking á Ovara Hjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 102/22 | 22/01377-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 33/22 | 22/01377-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 97/22 | 22/01377-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 22/01377-1 |

**Upprunin til málið**
Stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu. Býarskipanarliga er í fyrstu atløgu skilabest at víðka um verandi vinnuøkir, áðrenn farið verður undir at staðseta nýggj økir, hetta fyri at gagnnýta lendið og savna virksemið á einum stað, umframt at infrakervi, leiðingar v.m. longu er á staðnum.

Í løtuni hevur kommunan ongi vinnustykkir á sølulista. Víst verðir á økið omanfyri á Hjalla sum eina eyðsædda nýggja vinnuútstykking, tí hetta økið byggisamtyktarliga longu er eitt vinnuøki, men eisini tí at økið liggur tætt við aðra vinnuútstykking.

**Lýsing av málinum**
Linjuføringin av innkomuvegnum er nú endaliga løgd, og umsitingin mælir til, at leggja eina útstykking sunnan fyri vegin norðan fyri Stórutjørn, sí kortskjal *Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.*

Umsitingin hevur í longri tíð arbeitt við at skipa Stórutjørn sum nýggjan býling við bústøðum, stovnum, ítróttarøki, grønum økjum og lættari vinnu. Arkitektakapping varð hildin í 2020 og í mars 2022 varð ráðgevarasáttmáli undirskrivaður um skipanina av Stórutjørn. Millum økið við Stórutjørn og Vinnuútstykkingina á Hjalla liggur økið Ovari Skarðshjalli. Tað er hetta økið, sum umsitingin mælir til skal gerast til eina nýggja vinnuútstykking í kommununi.

Í sambandi við at Eysturoyartunnilin varð gjørdur, og Tunnilsfelagið hevði til ábyrgd at gera veg til tættasta innkomuveg, so varð vegur gjørdur frá rundkoyringini og allan vegin niðan á hamaran og verður eftir ætlan knýttur í innkomuvegin. Í løtuni er  innkomuvegurin í útboði til í fyrsta umfari at gera ein arbeiðsveg allan vegin yvir í Villingadalin. Nýggja vinnuútstykkingin bindir beinleiðis í innkomuvegin, og gerst íbindingin sostatt fyrsta íbindingin norðast á strekkinum.

Umsitingin mælir til, at nýggja vinnuútstykkingin verður ætlað til vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Hetta er bæði grundað á, at tað er týdningarmikið, at vinnan ikki ávirkar býlingsmenningina á Stórutjørn, umframt at mett verður at stórur tørvur er á vinnugrundstykkjum í hesum umhvørvisflokkunum. Lagt verður tí upp til at útleggja vinnuústykkingina sum B4-øki í almennu byggisamtyktini, ið umfatar vinnu í umhvørvisflokki 2-4. Undir lógir og ásetingar sæst lýsing av umhvørvisflokkunum 2-4.

Tá útstykkingin verður skipað, er tað umráðandi at skipa staðsetingina av virkjunum í mun til vinnuflokkarnar, soleiðis at bústaðarøkið hevur minst møguligan ampa av virkjunum og virkseminum. T.d kundu virkini verið lagað eftir, at tann tyngra vinnan verður staðsett oman móti Skarðshjalla og tann lættara vinnan oman móti ítróttarøkinum og bústaðarøkjunum á Stórutjørn.

Ein leyslig meting av projekteringini fram til høvuðsprojekt liggur á uml. kr. 2 mió. kr. Um farið verður undir at projektera nú í vár, so verður mett, at útstykkingin er klár at bjóða út til arbeiðstakara longu í heyst. Mett verður, at útstykkingin kann verða liðug í 2023-24.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Umhvørvisflokking av virkjum í Tórshavnar kommunu

*Flokkur 2*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til smávegis ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi og kann staðsetast í øki, har tað eisini eru bústaðir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga minni virkir sum bókbindarar, elektronikk verkstaðir og starvstovur. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 20 metur.*

*Flokkur 3*
*Umfatar virkir, ið geva orsøk til minni ávirkan á sítt umhvørvi, serliga orsakað av uttandura aktiviteti og kunnu staðsetast í ídnaðarøki ella í randarøki, sum minni dálkandi virkir. Virkir í hesum flokkinum eru serliga virkir sum hava tænastuvirksemi, t.v.s. handverkstaðir, maskinvirkir og bensinstøðir. Minsta frástøðan til bústaðir fyri henda flokk er 50 metrar.*

*Flokkur 4*
*Umfatar virkir, ið geva ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi, men eru tey lættastu av teimum tungu framleiðsluvirkjunum. Kunnu staðsetast í einum ídnaðarøki. Virkir í hesum flokkinum eru serliga matvøruvirkir, klædnavirkir og bilverkstaðir við sproytukabinu. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 100 metrar.*

**Upplýsingar frá umsitingini**
Neyðugt verður at broyta byggisamtyktina í sambandi við gerð av útstykkingini, og tí verður mælt til at fara undir hesa broyting skjótast.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
18/03588 Nýggj útstykking til vinnustykkir. Umhvørvisflokkur 3 til 7.
18/03468 Skipan av Stórutjørn

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
22/01377-2 Uppskot – vinnuústykking á Ovara Skarðshjalla.pdf.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | x |
| Umhvørvisavleiðingar | x | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

Í málinum 18/03468 Skipan av Stórutjørn varð á býráðsfundi 24.03.2022 samtykt at játta fígging til keyp av lendinum til vinnuútstykkingina, umframt at játta fígging til projektering av vinnuútstykkingini. Tískil verður ikki neyðugt í hesum málinum at fáa fígging til hesi viðurskiftir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við ráðgeva um projektering av vinnustykkjunum á Ovara Skarðshjalla
- at heimila umsitingini at bjóða útstykkingina út, tá projekteringin er liðug, og at gera sáttmála um arbeiðstøkuna.

- at fara undir at broyta byggisamtyktina fyri økið til eitt B4-øki
- at beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd við teirri viðmerking, at sáttmálin um arbeiðstøkuna verður at leggja fyri aftur avvarðandi nevndir.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt.

# 98/22 Keyp av mannskapskúrum til bygningsrakstur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.04.2022 | 101/22 | 22/01384-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 102/22 | 22/01384-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 98/22 | 22/01384-1 |

**Upprunin til málið**
Plássmangul til nýggju eindina "bygningsrakstur"

**Lýsing av málinum**
Bygningsrakstur er ein nýggj eind undir bygningsdeildini. 1. apríl byrja tveir formenn afturat leiðaranum. Ætlanin er at seta ein afturat. Tørvur er tí á fýra nýggjum skrivstovu plássum, WC og fundar facilitetum til eindina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Leiðarin fyri bygningsrakstur situr í dag inni á rakstrarstøðini á teknisku deild. Á rakstrarstøðini er ikki pláss fyri nýggju rakstrareindini. Leitað hevur verið eftir røttu loysnini í rakstrar umhvørvinum við Oyggjarvegin. Sí loftmynd í fylgiskjali.

Endamálið við at hava skrivstovurnar við Oyggjarvegin snýr seg eisini um at savna húsavørðarnar við Oyggjarvegin, og gera nýtslu av verkstøðunum á brandstøðini.

Húsavørðar hava í dag eitt verkstað í kjallaranum í badmintonhøllini í Gundadali. Staðið er ikki væl egnað. Samstundis ynskir frítíðarskúlin í badmintonhøllini at flyta eitt leigumál úr B 36 húsinum, sum húsar 3. flokki. Leiðslan vísir á avbjóðingar við at leiða virksemið í frástøðu, tí er ynski, at fáa kjallaran í badmintonhøllini til frítíðarskúla virksemið .

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Í samráðingum við MT-Højgaard um endauppgerð til verkætlanina URD, bjóðaði MT Højgaard TK tríggjar skúrar, sum felagið ikki brúkar meir. Kostnaðaráseting varð gjørd á kr. 400.000 fyri allar skúrarnar. Sí myndir & tekningar í fylgiskjali. Skúrarnir eru 3 ára gamlir og í góðum standi. Nýggir skúrar av hesum slagnum høvdu kostað umleið 750.000, um teir skulu keypast nýggir.

Samráðingarnar um URD, endaðu við semjuskjali, sum merkir at umleið 300.000 kr. verða eftir á íløgu kontoini, tá allar rokningar fyri verkætlanina eru goldnar

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Leiðarin á Brandstøðini hevur mett um og peikað á staðið, har ætlanin er at seta skúrarnar. Í dag standa gamlir skúrar á staðnum, sum áður hava verið nýttir til brandvenjingar.

**Skjøl**
"Myndir & tekningar" journalnummar 22/01384-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |

| Býráðsfundur<br>28. april 2022 | Blað nr.: 443<br><br>Formansins merki: |
|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at heimila umsitingini at keypa skúrarnar og at arbeiða víðari við at skipa arbeiðsplássini á vísta staðnum.

Rakstrar kontan "6110" ber kostnaðin, sum tilsamans verður mettur til umleið 500.000 kr. Biðið verður samstundis um heimild til at inntøkuføra 300.000 kr. av Íløgukontoini fyri verkætlanina "URD" til rakstrar kontoina 6110.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari ímóti og einari blankari við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Helena dam á Neystabø, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Jan Christiansen

# 99/22 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 37/21 | 21/02196-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 160/21 | 21/02196-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 188/21 | 21/02196-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.11.2021 | 70/21 | 21/02196-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 297/21 | 21/02196-2 |
| 6 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 302/21 | 21/02196-2 |
| 7 Tekniska nevnd | 26.04.2022 | 37/22 | 21/02196-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 120/22 | 21/02196-2 |
| 9 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 99/22 | 21/02196-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við at samráðingar hava verið millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um at kommunan tekur á seg at gera nýggjan uttara ringveg við íbindingum til Tórshavn er gjørd avtala millum partarnar um, at Føroya landsstýri letur Tórshavnar kommunu stuðul til part av verkætlanini.

**Lýsing av málinum**
Nýggjur uttari ringvegur í Tórshavn hevur verið í umbúna í mong ár og serliga síðani farið var undir at fyrireika Eysturoyartunnilin.

Landsverk hevur arbeitt við at fyrireika henda veg, og í hesi fyrireiking er linjuføring fyri vegin løgd og knútapunkt á linjuføringini staðsett (sí kort í fylgiskjølum). Vegurin verður gjørdur millum rundkoyring oman fyri Sandvíkarhjalla (C) og Marknagilsvegin við Dánjalstrøð (G). Á hesum strekkinum verða knútapunktini C1, C2 og C3, sum eru íbindingar til millum knútapunkt C og knútapunkt E, sum er rundkoyring við Villingadalsvegin/Sundsvegin. Úr knútapunkti E verður tunnil til knútapunkt F, sum er vestan fyri Hotel Føroyar. Í knútapunkti F verður gjørd rundkoyring, sum hevur fýra greinar: Ein í tunnilin, ein oman í knútapunkt G og tvær til Landið at føra ferðsluna til ávikavist Oyggjarvegin og til Sandoyarleiðina.

Alt vegastrekkið millum punkt B og G verður kommunalur vegur.

Samlaði kostnaðurin er mettur til at vera 288 mió. kr.

Stuðulin frá landinum verður í mesta lagið 110 mió. kr., sum ásett er í løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn. Stuðulin verður veittur yvir 5 ár.

Stuðulin er treytaður av, at

- arbeiðið við nýggja uttara ringvegnum verður framt í sama mun, sum stuðul verður goldin út.
- Nýggi uttari ringvegur skal lúka krøv til ferðslutrygd og vera atkomuligur fyri ferðslu til og frá meginøkinum. Hetta er tó ikki galdandi í tíðarskeiðum, tá vegarbeiði og tílíkt verður gjørt.

- Alt vegastrekkið skal haldast frítt fyri forðingar, sum t.d. ferðslubungur, soleiðis at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Nýggjar íbindingar í nýggja uttara ringveg kunnu bert gerast til vegir, sum eru ætlaðir til bilferðslu; ikki til atkomu til bygningar og tílíkt. Er neyðugt at gera nýggja íbinding til annað enn ein veg, sum bara er ætlaður bilferðslu, skulu hesar fyriskipast soleiðis, at hámarksferðin kann haldast, og ferðslan verður tarnað minst møguligt.
- Útgoldin stuðul kann verða kravdur afturgoldin, um treytirnar ikki verða hildnar. Útgoldin stuðul kann tó ikki verða kravdur afturgoldin, tá løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn er farin úr gildi.
- Fíggjarmálaráðið kann tinglýsa hesa avtalu á matrikulin, tá nýggi uttari ringvegurin er liðugur.

Avtalan er víðari treytað av, at Løgtingið samtykkir uppskotið til løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn, og at Tórshavnar Býráð samtykkir og fremur verkætlanina sambært ásetingum í løgtingslógini og sambært avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um Fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.

Umsitingin kannar alt tøkt verklagstilfar, forkanningar og alt annað tilfar, sum Landsverk hevur framleitt í sambandi við hesa verkætlan, og sum uttan viðurlag verður latið Tórshavnar kommunu sambært avtaluni.

Byggiskrá verður gjørd við støði í úrslitinum av hesum kanningum, og arbeiðið at fremja verkætlanina verður boðið út av umsitingini sum heildarverkætlan, antin fyri:
- Alla verkætlanina samlað,
- ella fyri vegir og tunnil hvør sær.

Umsitingin arbeiðir í hesum sambandi eisini við at finna fíggingarleist fyri kommununnar part av verkætlanini.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Innkomuvegur yvirlit, j.nr. 21/02196-4
Avtala_FMR_TK, j.nr. 21/02196-1
LI_uttararingveg, j.nr. 21/02196-1

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 446 |
| | | Formansins merki: |

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Biðið verður um 1 mió. kr. til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyri standandi fyrireikingar.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.000.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: juni-des 21 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.000.000 | 8175 | L81037 | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við:

- avtaluni millum Fíggjarmálaráðið og Tórshavnar kommunu um fíggjarligan stuðul til nýggjan uttara ringveg í Tórshavn.
- at umsitingin fær heimild til at gera byggiskrá fyri heildararbeiðstøku.
- at umsitingin fær heimild til at bjóða arbeiðið út í heildararbeiðstøku fyri:
    - Alla verkætlanina samlað,
    - ella fyri vegir og tunnil hvør sær.
- Umsitingin fær játtað ein fíggjarkarm á kr. 1.000.000,- av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, L81037, Innkomuvegur kommunali partur, til at heinta inn uttanhýsis ráðgeving í sambandi við omanfyristandandi fyrireikingar.
- Málið soleiðis verður samtykt og beint víðari í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt við teirri broyting, at partar av vegnum/tunnilin kann bjóðast út í innbodnari licitatión.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at projektering av tunli og vegum skal gerast, er tørvur á at umsetingini verður heimilað at gera hesar sáttmálar. Í hesum sambandi er tørvur á einum samlaðum karmi á kr. 3.500.000. Hesin karmur er treyt fyri, at projekteringin av innkomuvegnum og tunli kunnu fremjast og gerast liðug. Skotið verður upp, at afturat teimum kr. 1.000.000 og kr. 751.000, sum áður eru játtaðar og framfluttar frá 2020 til verkætlanina L81037 Innkomuvegur kommunalur partur, verða játtaðar kr. 1.750.000, sum ikki verða avgreiddar av ymiskum øðrum kontum og verkætlanum í 2021:

- 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
- 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
- 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan

- 250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at tekniska nevnd tekur undir við at:
- Umsitingini verður heimilað at gera sáttmálar um projektering av innkomuvegi og tilhoyrandi tunli innan ein samlaðan karm á kr. 3.500.000
- Karmurin til projektering verður fíggjaður av:
    - Verandi tøkari upphædd á L81037 Innkomuvegur kommunalur partur
    - 500 tkr av løgukarmi LK81042, Vegaverkætlanir,
    - 500 tkr av løgukarmi LK81043, Parkeringstunnil,
    - 500 tkr av Løgujáttan L81046, Ferðslutrygd við Eysturskúlan
      250 tkr av Løgujáttan L81043, Dagføring Norðrari Ringvegur við Norðurlandahúsið.

**Tekniska nevnd 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, men at arbeiðið verður fíggjað av íløguætlan fyri 2022 (Innkomuvegur).

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við teknisku nevnd.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Turið Horn, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg

**Ískoyti**:
Fyrsti partur av uttara ringvegi, ið er arbeiðsvegur frá á Hjalla til Villingadagsvegin, varð boðin út og lægsta boð à kr. 17.272.128 uttan MVG, hevði Articon.
Fyri at seta arbeiðið í gongd, verður biðið um fylgjandi játtan:

| | |
|---|---|
| • Tilboð | 17.272.128 |
| • Verkætlanarleiðsla, eftirlit og byggileiðsla | 1.000.000 |
| • Avleiddar verkætlanir | 5.600.000 |
| • 6,25 MVG | 1.492.008 |
| | |
| Tilsaman | 25.364.136 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at tikið verður av lægsta tilboðnum frá Articon, at játtaðar verða kr. 25.364.136 til verkætlanina, fyrsti partur av uttara ringvegi, kr. 4.600.000 av LK81037 og kr. 20.764.136 sum eykajáttan og beina málið í býráðið, umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 26. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd við teirri broyting, at kr. 20.764.136,00 verða játtaðar av mettum meirinntøkum í 2022. Um metingarnar ikki halda, verður fíggingin løgd fyri aftur, møguliga sum lántøka. Málið beint í býráðið sum eykajáttan hvat viðvíkur upphæddini á kr. 20.764.136,00.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð og málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 100/22 Bráðfeingis ábøtur á vegakervið 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.04.2022 | 35/22 | 22/01410-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 99/22 | 22/01410-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.04.2022 | 119/22 | 22/01410-1 |
| 4 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 100/22 | 22/01410-1 |

**Upprunin til málið**
Vetrarnir 2020/2021 og 2021/2022 hava verið sera merktir av kava og frosti. Kavarudding og salting hava í hesum tíðarskeiði verið viðvirkandi til, at standurin av fleiri vegastrekkjum í Tórshavn er versnaður so mikið, at akuttar ábøtur eru neyðugar. Samskifti hevur verið millum umsitingina og formannin í teknisku nevnd um at fáa henda bráðfeingis tørv á ábótum framdan, áðrenn vegakervið ferst enn verri.

**Lýsing av málinum**
Rakstrarstovnurin undir teknisku deild hevur lagt fram asfalteringsætlan, sum er grundað á viðlíkahaldstørvin, áðrenn hesin eyka tørvurin er staðfestur eftir at kavin 2021/2022 er farin. Metingar hjá Rakstarstovninum eru, at slitið, sum nú er staðfest, ikki kann bøtast innan verandi fíggjarkarmar á kt. 8112 Asfalt fyri 2022.

Tørvur er á, at bráðfeingis tiltøk verða setta í verk beinanvegin, sum kortini ikki ávirka verandi asfaltsætlan. Átøkini eru serliga hesi:

- Strípufresingar og –asfalteringar
    - Bøtur, sum eru meira haldbarar enn vanlig uppfylling av holum
- Yvirflatuviðgerðir
    - Endurnýgging av bitumen, sum leingir haldbæri av asfaltinum, tó ikki eins leingi og asfaltering.
- Framskundað fresing og asfaltering.
    - Vegateinar, sum ikki tola at bíða eftir asfaltsætlan, mugu raðfestast fremst.

Vandi er fyri, at um nevndu átøk ikki verða framd í 2022, at mest slitnu vegirnir fara at slítast við enn størri ferð. Hetta við tí úrsliti, at skaðar kunnu henda á fólk og akfør.
Mett verður, at Rakstrarstovnurin kann framleiða ábøtur eftir omanfyri nevnda leisti fyri kr. 3.000.000 í 2022 á teimum vegateinum, sum hava størstan tørv.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>28. april 2022 | Blað nr.: 450<br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játtaðar verða kr. 3.000.000 av konto XXX á konto 8112.

**Tekniska nevnd 04. apríl 2022:** Samtykt at heita á fíggjarnevndina at útvega fígging til hesa bráðfangis neyðugu íløgu.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 27. apríl 2022:** Samtykt at játta 3 mió. kr. av konto 6175 umsiting og røkt av fastari ogn (Keyp/søla) á konto 8112 asfalt og at beina málið í býráðið sum eykajáttan.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Einmælt samtykt**.**

## 101/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.03.2022 | 87/22 | 22/00009-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.03.2022 | 74/22 | 22/00009-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.04.2022 | 116/22 | 22/00009-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.04.2022 | 101/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mars 2022:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 28. apríl 2022:** Framlagt og góðkent.

**FUNDURIN LOKIN KL. 18.30**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Annfinn Brekkstein | Tróndur Sigurðsson |
| Kári Johansen | Kristianna Winther Poulsen | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Ruth Vang | Rói Bjarnason Poulsen | Helena Dam á Neystabø |
| | Jan Kartin Christiansen | |